| | Býráðsfundur<br>25. oktober 2018 | Blað nr.: 897<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# GERÐABÓK

**Dato:** 25. oktober 2018 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:** 233/18-254/18

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Sjúrður Olsen
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Heðin Mortensen

**LUTTÓKU EISINI:**
Barbara Vang
Marius Muller
Jóan Petur Hentze
Eyðna Justinussen

**LUTTÓKU IKKI:**
Annfinn Brekkstein

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 233/18 | 18/00020-1 | Mál beind í nevndir 2018 | 900 |
| 234/18 | 18/03593-1 | Útstykking Kollafjørður. Fýra keyparar ynskja at lata grundstykkini innaftur og at ávegisgjaldið afturflutt. | 901 |
| 235/18 | 18/03683-1 | Matr.nr. 1332e, 1333d, Tórshavn. Víðarisøla. | 903 |
| 236/18 | 18/00057-2 | Útbygging av frítíðarskúlanum á Argjahamri | 905 |
| 237/18 | 16/04613-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í mentamálanevndina | 910 |
| 238/18 | 16/04663-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í byggi- og býarskipanarnevndina | 912 |
| 239/18 | 16/04632-1 | Val av 5 limum í gøtunavnanevndina | 914 |
| 240/18 | 16/03091-2 | Gøtunavn til útstykking undir Kongavarða, matr. nr. 255a, Argir | 915 |
| 241/18 | 17/03883-2 | Skúlin á Fløtum - hølisviðurskifti (Realskúlin) | 918 |
| 242/18 | 18/02895-1 | Nýggj stórhøll (multiarena) til ítrótta- og mentanarendamál | 936 |
| 243/18 | 18/00908-5 | Umsókn um keyp av øki burtur av matr. nr. 139b, Hoyvík til bygging av einum biogassanleggi | 940 |
| 244/18 | 14/02605-15 | Ljósregulering við Eystara Ringvegur/Hvítanesvegur | 944 |
| 245/18 | 18/00154-3 | Umsókn um yvirtøku av vegi matr. nr. 1361r og 13161b, Tórshavn | 948 |
| 246/18 | 17/03303-2 | Hugskot/uppskot um nýtslu av tilfari úr Sandoyartunlinum. | 950 |
| 247/18 | 18/00786-1 | Tillagan av parkeringsøkinum hjá Havnar Sjónleikarfelag matr. nr. 763, Tórshavn til almenna nýtslu | 954 |
| 248/18 | 18/02077-1 | Mold- og avgrevsturpláss Frammi í Dal í Kollafirði | 957 |
| 249/18 | 18/03453-1 | Skipan av Gundadali | 960 |
| 250/18 | 18/03468-1 | Skipan av Stórutjørn | 963 |
| 251/18 | 18/03385-1 | Langfreistað skuld | 966 |
| 252/18 | 18/03373-1 | Eykajáttan | 967 |
| 253/18 | 18/01927-1 | Fíggjarætlan 2019 | 969 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 254/18 | 18/00018-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2018 | 975 |
| 255/18 | 16/00962-1 | Tórsvøllur - vestursíðan | 978 |

## ***233/18 Mál beind í nevndir 2018***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 7/18 | 18/00020-1 |
| 2 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 30/18 | 18/00020-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 50/18 | 18/00020-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 70/18 | 18/00020-1 |
| 5 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 110/18 | 18/00020-1 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 138/18 | 18/00020-1 |
| 7 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 180/18 | 18/00020-1 |
| 8 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 203/18 | 18/00020-1 |
| 9 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 233/18 | 18/00020-1 |

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt.

# 234/18 Útstykking Kollafjørður. Fýra keyparar ynskja at lata grundstykkini innaftur og at ávegisgjaldið afturflutt.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 276/18 | 18/03593-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 234/18 | 18/03593-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Fýra av keyparunum av grundstykkjum í Kollafirði, hava av ymiskum orsøkum valt, at lata grundstykkini innaftur.

Keypararnir hava skrivað undir fyribils skeytið, og hava goldið helvtina av keypspeninginum. Hesir 4 keypararnir hava goldið tls. kr. 490.925,46

Vanliga mannagongdin er fasthalda keypararnar fyri skeytunum higartil, at kommunan hevur tillutað nýggjum keyparum grundstykkini eftir bíðilistanum. Bíðilistin er tikin av, og hevur umsitingin í hesum føri valt at bjóða teimum grundstykki sum við seinastu tillutan ikki fingu grundstykki. Arbeiðið dregur út, og verður tað mett ikki at vera rímiligt, at tað skal ganga út yvir hesar keypararnar.

Áhugin fyri grundstykkjunum er stórur, og verður mett, at váðin við at taka stykkini innaftur er sera lítil.

**Lógir, ásetingar o.a.** Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað.

**Upplýsingar frá umsitingini.**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/læltar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Yvirlit yvir teir keyparar sum ynskja at lata grundstykki innaftur.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at afturflyta hesum keyparum goldið ávegisgjøld tls. kr. 490.925,46

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>25. oktober 2018 | Blað nr.: 903<br>Formansins merki: |

## 235/18 Matr.nr. 1332e, 1333d, Tórshavn. Víðarisøla.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.10.2018 | 298/18 | 18/03683-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 235/18 | 18/03683-1 |

**Upprunin til málið:** Umsókn frá Advokati.

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Viðvíkjandi matr.nr. 1332e og 1333d, Tórshavn. ( Staravegur 13 )

Talan er um planerað grundstykkir. Samlað vídd 5.849m2. Grundstykkini liggja annars óbygd.

Grundstykkini hava ligið óbygd øll árini frá fyrst í 1980unum, men fyriliggja nú ætlanir um at byggja eitt hotell á grundstykkinum.

Verandi eigari søkir nú kommununa um at loyva víðarisølu av grundstykkjunum, sí skjal 18/03683-2.

Grundstykkið hevur álagdan servitutt um byggifreist og afturkeyp, frá 1983. Sambært servituttinum, kann kommunan krevja ognarættin til óbygda grundstykkið aftur ímóti fullum endurgjaldi av dokumenteraðum útreiðslum hjá eigaranum við 5 % í rentu p.a. frá yvirtøkudegnum at roknað.

Kommunan samtykti í ár 2000 at loyva víðarisølu, treytað av at kommunan kundi góðtaka virksemið á økinum og at kommunan skuldi varðveita átalurættin.
Verandi eigari hevur átt grundstykkið síðani tá.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Tinglýstur servituttur.

**Umhvørvisárin.** Ongi

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** 18/03683-2 Umsókn frá advokati við hjálagdum nýggjum og gomlum skeyti.
18/03683-3 Kort.
18/00251. Byggiloyvi.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til at góðkenna víðarisøluna og at víkja forkeyps/afturkeypsrættin í hesum føri. Servituttir verða óbroyttir galdandi.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt.

# 236/18 Útbygging av frítíðarskúlanum á Argjahamri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 4/18 | 18/00057-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 28.02.2018 | 78/18 | 18/00057-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 28.02.2018 | 62/18 | 18/00057-2 |
| 4 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 37/18 | 18/00057-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 155/18 | 18/00057-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 186/18 | 18/00057-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 173/18 | 18/00057-2 |
| 8 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 145/18 | 18/00057-2 |
| 9 Býráðsfundur | 04.07.2018 | 172/18 | 18/00057-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 08.10.2018 | 304/18 | 18/00057-2 |
| 11 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 297/18 | 18/00057-2 |
| 12 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 236/18 | 18/00057-2 |

**Upprunin til málið:**
Sí niðanfyri

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Víst verður eisini til mál 14/01009 í sambandi við, at fimleikarhøllin er bygd út til nýggja ítróttarhøll á Argjahamri, og at tað í hesum sambandi varð tikin avgerð um at byggja frítíðarskúlan út, tí sum bygningspartar eru teir sambygdir. Talan er um 130 m2 stóran rábygning, ið er gørdur og innilokaður, men uttan vindeygu og hurðar.

Umsitingin hevur biðið MAP arbeiða víðari við hesari verkætlan við at prosjektera, søkja um byggiloyvi og gera eina samlaða kostnaðarmeting at byggja frítíðarskúlan lidnan. Her er í høvuðsheitum talan um timbur-, gólv-, stál-, el-, hvs-, ventilatións- og málaraarbeiði, vindeygu og hurðar, snyrilsståltrappu til høllina, íroknað ráðgevarakostna, prosjektumsiting og trygging. Sí annars skitsutekning av innrætting.

Umsitingin ætlar at bjóða arbeiðið út í undirhondsboð til høvuðsarbeiðstakararnar Sp/f TG-Verk og Sp/f 10.dec. 2013. TG-Verk kennir til verandi høll á Argjahamri. Sp/f 10.dec. 2013 hevur arbeiðsroyndir við loftshæddini á Hoyvíkshøllini, sum er eitt líknandi arbeiði sum útbyggingin av frítíðarskúlanum.

Á íløguætlanini fyri 2018 eru settar kr. 1,8 mió av til endamálið á kontu 3175 barnaansing.

**Lógir, ásetingar o.a.**
ABF 06, ABR89

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
14/01009

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at bjóða byggingina av frítíðarskúlan á Argjahamri út eftir omanfyristandandi leisti og at geva umsitingini heimild at samráðast um sáttmála at leggja fyri nevnd til endaliga støðutakan.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Gjørt er uppskot til ráðgevaraavtalu við MAP Arkitektar áljóðandi kr. 285.000, ið fevnir m.a. um myndugleikaprosjekt, útbjóðingartilfar og skipan av útboði, høvuðsprojekt, byggileiðslu, fakeftirlit og garantisýn.

Tíðarætlan fyri samlaðu verkætlanina er, at myndugleikaprosjekt skal vera sent kommununi 1. mars 2018, byggiloyvi fáast til vega og útboð til arbeiðstakarar í apríl. Ætlandi verður arbeiðstøkusáttmáli latin mentamálanevndini í mai, so at byggingin kann byrja í juni. Byggingin skal vera liðug um ársskiftið.

Biðið verður harumframt um at flyta kr. 1.800.000 av íløgukarminum 3175 Barnaansing L00001 til nýggja løgukontu Útbygging Frítíðarskúlanum á Argjahamri.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at góðkenna ráðgevarasáttmálan og at játta kr. 1.800.000 á løgukarmi

**Mentamálanevndin 28. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Byggiarbeiðið er boðið út í undirhondsboð til arbeiðstakararnar Sp/f BP Bygging og Sp/f TG-Verk. Innkomnu tilboðini eru soljóðandi:

BP Bygging: kr. 2.969.600,00 u/mvg.

TG-Verk: kr. 2.830.660,00 u/mvg.

Høvuðsráðgevin og umsitingin hava verið í samráðing við lægsta tilboðsgevan TG-Verk, til tess at eftirkanna tilboðið og at finna møguligar tillagingar, ið kunnu hava við sær lægri kostnað. Eftir hesar sparingar er tilboðið hjá TG-Verk kr. 2.408.822,00 u/mvg. Avleiðing av hesum er m.a., at trappurúmið/-uppgongdin til høllina ikki verður gjørd.

Umsitingin hevur síðani gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera Frítíðarskúlan á Argjaharmri lidnan, tvs. tilboðskostnaðurin (hvú), ráðgevarakostnaður, prosjektumsiting, trygging og mvg íroknað, og er samlaði kostnaðurin kr. 3.147.695,00.

Sum kunnugt er játtanin kr. 1,8 mió á kontu 3175 L31007 Útbygging av frítíðarskúlanum á Argjahamri. Tað resta sostatt kr. 1,35 mió í. Kostnaðarmetingin, sum íløgujáttanin byggir á, er upprunaliga frá várinum 2017, men ásannast má, at henda hevur ikki verið nóg neyv.

Aðrar íløgujáttanir eru ikki á grein 3 í fíggjarætlanini.

Mett verður, at til ber at flyta kr. 300.000 av rakstrarkontu 3317 Ungdómshús á Argjum, ið er minninýtsla frá 2017, og kr. 200.000 av rakstrarkontu 3142 Frítíðarskúlan á Argjahamri, ið somuleiðis stavar frá minninýtslu í 2017, til verkætlanina. Játtanartørvur er tá kr. 850.000, ið mett verður ikki ber til at fáa til vega á grein 3.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at fáa til vega kr. 850.000 aftrat til verkætlanina til tess at kunna taka av tilboðnum og gera arbeiðstøkusáttmála.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Víst verður til fíggjartørvin omanfyri, har kr. 850.000 vanta í til tess at kunna gera arbeiðstøkusáttmála við lægsta tilboðsgevan. Umframt nevndu fígging verður mett, at til ber at játta kr. 676.000 av kontu 3214 Broytingar og minni umvælingar, og kr. 172.000 av kontu 3216 Verkætlanir á ungdómsøkinum.

Viðmerkjast skal, at játtanin til kontu 3214 er ætlað til at gera realskúlan kláran til dagstovn, men onnur játtan verður ætlandi fingin til vega sum íløgu í eykajáttan (sí mál 18/01522). Viðvíkandi kontu 3216, sum er játtan til frítíðartilboðið til 3. flokk, so verður mett, at skerda játtanin onga ávirkan fær á virksemið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin í barna- og ungdómsdeildini mæla til at gera arbeiðstøkusáttmála vil TG-Verk fyri tilboðsupphæddina kr. 2.408.822 u/mvg og játta kr. 3.147.695 til samlaða byggi- og projektkostnaðin av løgukontu 3175 L31007 Útbygging av frítíðarskúlanum á Argjahamri.

Harumframt verður mælt til at flyta kr. 200.000 av kontu 3142 Frítíðarskúlin á Argjahamri, kr. 676.000 av kontu 3214 Broytingar og minni umvælingar, kr. 172.000 av kontu 3216 Verkætlanir á ungdómsøkinum, og kr. 300.000 av kontu 3317 Ungdómshús á Argjum til løgukontu 3175 L31007 Útbygging av frítíðarskúlanum á Argjahamri.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Heðin Mortensen, stemmar blankt.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið i býráðið at viðgera sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 04. juli 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Eftir at verkætlan, frítíðarskúlin á Argjahamri, varð samtykt í býráðnum, hevur TG-Verk boðað frá, at teir ikki longur standa við tilboðið. TG-Verk viðmerkir, at "tilboðið á Frítíðarskúlan á Argjahamri sambært ABF06, §3, stk. 5, ikki longur eru bindandi fyri TG Verk Sp/f, tí freistin á 20 dagar langt síðani er farin og TG Verk Sp/f ikki hevur lovað at staðið longur við tilboðini". Hetta er smb. ABF06 heimilað, tí 20 daga freistin er farin langt síðani farin, og eingin accept var givin, av tí at bíðað hevur verið eftir politiskari viðgerð. Niðurstøðan er, at TG-Verk eru leysgivnir av tilboðnum. Tórshavnar kommuna hevur síðani verið í sambandi við hægra tilboðsveitara, BP Bygging, hvørt teir eru áhugaðir í at gera verkætlanina við somu eindarprísum og sparingum sum hjá TG-Verk, áljóðandi 2.408.822,00 kr u/mvg. Men BP bygging hava váttað, at teir ikki eru áhugaðir í tilboðnum.

Peningurin er longu settur av til verkætlanina, og fyri at stígur ikki kemur í, hevur umsitingin spurt annan arbeiðstakara sp/f VD, timburmeistara Valbjørn Dalsgarð, hvørt hann er áhugaður at gera verkætlanina við somu avtalum, eindarprísum og sparingum áljóðandi 2.408.822,00 kr u/mvg. Samráðingar hava verið partanna millum og niðurstøðan er, at Sp/VD boða frá, at teir standa við tilboðnum at gera verkætlanina við somu avtalum, eindarprísum og sparingum áljóðandi 2.408.822,00 kr u/mvg. Av tí at trupulleikar hava verið við vindeygunum í frítíðarskúlanum og skúlanum á Argjahamri sum heild, hevur umsitingin gjørt tillagingar í tilboðnum við at broyta 3G dupultfasadu vindeyguni til standard einkultfasadu vindeygu, sum eru við sama sniði, liti og tilfari sum verandi. Útsjónd broytist lítið og einki uttandura.

| Býráðsfundur<br>25. oktober 2018 | Blað nr.: 909 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at gera arbeiðstøkusáttmála við sp/f VD, at gera verkætlanina, Frítíðarskúlin á Argjaharmi við somu avtalum, eindarprísum og sparingum áljóðandi 2.408.822,00 kr u/mvg.

**Mentamálanevndin 08. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Heðin Mortensen og Marin Katrina Frýdal luttóku ikki í viðgerðini.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>25. oktober 2018 | Blað nr.: 910<br>Formansins merki: |

# 237/18 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í mentamálanevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 9/16 | 16/04613-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 237/18 | 16/04613-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Sambært § 28 í kommunustýrisskipanini er ásett:

**2. petti**. Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Dagstovnaøkið 2. Fólkaskúli 3. Forskúli 4. Frítíðarskúli 5. Ungdómsvirksemi
6. Námsfrøðiliga ráðgevingin 7. Kvøldskúli 8. Musikkskúli 9. Býarbókasavn
10. Býarsavn 11. Mentanarhøli 12. Stuðulsskipanir 13. Svimjihøll
14. Uttandura vallir, ítróttaranlegg og ítróttahallir
15. Onnur mál av mentunarligum týdningi í kommununi.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Gunnvør Balle | Bergunn Kass |
| Turið Horn | Jákup Dam |
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Dam |
| Heðin Mortensen | Helena Dam á Neystabø |
| Halla Samuelsen | Bjørghild Djurhuus |

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Vald vóru:

| Fastur limur: | Varalimur: |
|---|---|
| Gunvør Balle | Bergun Kass |
| Jákup Dam | Bergun Kass |
| Marin Katrina Frydal | Bergun Kass |
| Heðin Mortensen | Helena Dam á Neystabø |
| Halla Samuelsen | Bjørghild Djurhuus |

# 238/18 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í byggi- og býarskipanarnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 5/16 | 16/04663-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 238/18 | 16/04663-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Sambært § 25 í kommunustýrisskipanini er ásett:

**1. petti.** Byggi og býarskipanarnevndin hevur 5 limir.
**2. petti.** Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Býarskipan og byggisamtyktir, 2. Útstykkingar , 3. Byggimál , 4. Lendismál
5. Kirkjugarðar, 6. Bygningsrakstur og -viðlíkahald av øllum kommunalum bygningum og anleggum eftir ásettari mannagongd
7. Fríðkan (viðarlundir, spælipláss, gøtur)
8. Áir, veitir og jarðarognir, tað veri seg traðarognir, urtagarðs- og onnur jarðar-stykki.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Gunnvør Balle |
| Bogi Andreasen | Turið Horn |
| Jákup Dam | Bergunn Kass |
| Tróndur Sigurðsson | Annfinn Brekkstein |
| Helena Dam á Neystabø | Halla Samuelsen |

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Vald vórðu:

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Gunvør Balle |
| Bogi Andreasen | Jákup Dam |
| Turið Horn | Jákup Dam |
| Tróndur Sigurðsson | Annfinn Brekkstein |
| Helena Dam á Neystabø | Halla Samuelsen |

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. oktober 2018 | | Blað nr.: 914 |
| | | Formansins merki: |

# 239/18 Val av 5 limum í gøtunavnanevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 18/16 | 16/04632-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 239/18 | 16/04632-1 |

**Málslýsing:**
Arbeiðssetningurin hjá gøtunavnanevndini er soljóðandi (J.nr. 2010-0496):

"Gøtunavnanevndin er ráðgevandi nevnd hjá Tórshavnar býráði. Arbeiðssetningur hennara er soljóðandi: Gøtunavnanevndin kemur við uppskotum og ger tilmæli til mentamálanevndina um gøtunøvn, nøvn á torgum og øðrum slíkum nøvnum í kommununi eftir áheitan frá umsitingini. Eisini kann nevndin verða biðin um ummæli ella tilmæli um nøvn á bygningum hjá kommununi. Mentamáladeildin útvegar skrivara."

Fimm nevndarlimir skulu veljast.

Av teimum fimm verandi nevndarlimunum eru hesir tríggir sinnaðir at halda fram. Marjun Arge Simonsen, Viggo Christiansen og Guðrun Haustein.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í Gøtunavnanevndina.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu Birgar Johannesen, Jógvan Arge, Kristin Magnussen, Marjun A. Simonsen og Guðrun Haustein.

**Ískoyti:**
Á fundi í Gøtunavnanevndini 18.09.2018 boðaði Guðrun Haustein frá, at hon ætlar at gevast í Gøtunavnanevndini. Hon er tó sinnað at vera í nevndini, til nýggjur limur er valdur. Guðrun Haustein varð vald í Gøtunavnanevndini í november 1998.
Í teldubrævi 12.10.2018 boðaði Birgar Johannessen frá, at hann tekur seg úr gøtunavnanevndini. Birgar Johannessen varð valdur í nevndina 30.12.2016.

Sostatt skulu tveir nýggir nevndarlimir veljast.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja tveir nýggjar limir í Gøtunavnanevndina.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Vald vóru Jógvan á Dul og Viggo Christiansen**.**

## 240/18 Gøtunavn til útstykking undir Kongavarða, matr. nr. 255a, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 22.08.2016 | 7/16 | 16/03091-2 |
| 2 Gøtunavnanevndin | 20.09.2016 | 10/16 | 16/03091-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 268/16 | 16/03091-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 02.11.2016 | 280/16 | 16/03091-2 |
| 5 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 338/16 | 16/03091-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 08.10.2018 | 316/18 | 16/03091-2 |
| 7 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 240/18 | 16/03091-2 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við nýggja útstykking undir Kongavarða er heitt á gøtunavnanevndina um at koma við uppskoti til gøtunavn til útstykkingina. Tekning er hjáløgd.

**Gøtunavnanevndin 22. august 2016:** Málið varð umrøtt og verður viðgjørt aftur á næsta fundi.

**Gøtunavnanevndin 20. september 2016:** Nevndin mælir til at nevna vegin Sørinargøta eftir Søren Emil Müller, sum var borgarstjóri 1913-1920. Hann var eisini bóndi og hevði hetta lendið i festi.
Vegurin á ætlaðu útstykkingini vestureftir kann so verða uppkallaður eftir næsta borgarstjóra i røðini, Anton Fr. Degn.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at velja millum hesi uppskot:
1. Undir Kongavarða: Tað hevur við sær at talmerkingin í adressunum verður tillagað og at allur býlingurin fær sama navn.

2. Við Tvættá: Er talan um á sum rennur eystanfyri økið og er millum sjálvt økið og Skúlan á Argjahamri. Ætlandi verður gongubrúgv til skúlan gjørd tvørturum Tvættánna.

3. Undir Suðurvarða: Er talan um varða á Reyninum, sum er skamt frá økinum. Suðurvarði sæst í ein beinan sunnan úr Vágsbotni og hevur søguliga havt týdning sum peilimerki eins og Vesturvarði.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Útsett.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at velja millum hesi fýra uppskotini:
1. Undir Kongavarða: Tað hevur við sær, at talmerkingin í adressunum verður tillagað, og at allur býlingurin fær sama navn.
2. Við Tvættá: Er talan um á, sum rennur eystan,fyri økið og er millum sjálvt økið og Skúlan á Argjahamri. Ætlandi verður gongubrúgv til skúlan gjørd tvørtur,um Tvættánna.
3. Undir Suðurvarða: Er talan um varða á Reyninum, sum er skamt frá økinum. Suðurvarði sæst í ein beinan sunnan úr Vágsbotni og hevur søguliga havt týdning sum peilimerki eins og Vesturvarði.
4. Við Klingrutjørn: Er talan um lítla tjørn skamt oman fyri byggiøkið.

**Mentamálanevndin 02. november 2016:** Samtykt at gøtunavnið til útstykkingina verður *Klingrutjørn* og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Mentamálanevndin samtykti 2. november 2016, at gøtunavnið skal vera *Klingrutjørn*. Umsitingin metir, at formliga gøtunavnið heldur eigur at vera "við Klingrutjørn".

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at formliga gøtunavnið verður "við Klingrutjørn".

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Síðan útstykkingin fekk navnið "Við Klingrutjørn", hevur orðaskifti verið, um navnið skal vera *Við Klingrutjørn* ella *Við Klingurstjørn*. Hetta kom serliga fram aftur, tá samtykt varð at nýta sama navn til seinnu útstykkingina eisini (J. nr. 17/03498).

Tórshavnar kommuna vendi sær til Staðarnavnanevndina um málið. Hon hevur viðgjørt tað á tveimum fundum, 6. september 2017 og 25. september 2018, og hevur sent kommununi úrskrift úr fundarfrágreiðingunum.

Frá fundi 6. september 2017 í Staðarnavnanevndini:
"Drúgv umrøða var um spurningin. Staðfestast kann at upprunin til forliðið er *Kringlu*-, sum við umkasti av *r* og *l* er vorðið til *Klingru*-, sum er at finna í mongum føroyskum staðarnøvnum. *Klingurs*- tykist vera úrslit av eini ungari broyting, tí tey bæði dømini vit hava um *Klingurs*- (Hattarvík 1959, Argjum 1985), eru í eldri uppskriftum skrivaði *Klingru*-: *Klingrusnið* í Hattarvík 1853, *Klingrutjørn* á Argjum 1956.
Nevndin heldur tí fast við *Klingrutjørn* sum navn á tjørnini, tí tað tykist umboða tann eldra navnaformin. Hinvegin er tað upp til býráðið um tað velur at brúka tann eldra formin *Klingrutjørn* ella tann yngra *Klingurstjørn* í navninum á tí nýggja bústaðarøkinum.
Nevndin skal annars gera vart við, at um býráðið vil hava fyriseting við í navninum á bústaðarøkinum, eigur henda fyriseting at verða skrivað við stórum (*Við Klingrutjørn*) á skeltum, kortum og í navnalistum (men við lítlum í samanhangandi teksti, t.d. "Tey búgva við Klingrutjørn"), so sum ásett er í

stavsetingarreglunum hjá Staðarnavnanevndini. Ein møguleiki sum eisini varð nevndur, var onga fyriseting at hava og nevna búsetingina "Klingrutjørn". "

Frá fundi 25.09.2018 í Staðarnavnanevndini:
***"****Klingrutjørn* ella *Klingurstjørn*? Áheitan frá Tórshavnar býráð um at taka málið upp til nýggja viðgerð.
*Klingrutjørn* sum navn á tjørnini varð í síni tíð (1989) sett á kortið út frá teimum heimildum ið vóru tøkar. Seinni er komið fram at argjafólk siga *Klingurstjørn*, og at tey vilja hava at navnið á teirri nýggju búsetingini (vegnum) verður *Við Klingurstjørn*. Staðarnavnanevndin samtykti á seinasta fundi at lata tað upp í hendurnar á Tórshavnar býráð at gera av hvønn form tey velja. Av tí at einki nýtt er komið fram í málinum, hevur nevndin somu støðu."

Viðmerkjast skal, at málið um seinnu útstykkingina (J.nr. 17/03498) verður tikið upp til nýggja viðgerð, tí Umhvørvisstovan og tekniska fyrisiting hjá kommununi mæla til, at innkoyringarvegurin frá Glyvursvegi og seinna útstykkingin fáa eitt annað navn.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at formliga gøtunavnið verður "við Klingrutjørn" og málið verður beint í býráðið.

**Mentamálanevndin 08. oktober 2018:** Samtykt at navnið skal verða «við Klingurstjørn» og beina málið í býráðið. Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini.
Klik her for at angive tekst.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Málið var samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og ongari blankari.
Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

## 241/18 Skúlin á Fløtum - hølisviðurskifti (Realskúlin)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 308/17 | 17/03883-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 3/18 | 17/03883-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 58/18 | 17/03883-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 08.02.2018 | 70/18 | 17/03883-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 90/18 | 17/03883-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 129/18 | 17/03883-2 |
| 7 Mentamálanevndin | 23.04.2018 | 150/18 | 17/03883-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 24.04.2018 | 130/18 | 17/03883-2 |
| 9 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 82/18 | 17/03883-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 167/18 | 17/03883-2 |
| 11 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 139/18 | 17/03883-2 |
| 12 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 114/18 | 17/03883-2 |
| 13 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 163/18 | 17/03883-2 |
| 14 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 215/18 | 17/03883-2 |
| 15 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 241/18 | 17/03883-2 |

**Upprunin til málið:**
Uppskot frá skúlastjóranum í Skúlanum á Fløtum um, hvussu høli í skúlanum kunnu skipast.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í oktober var dialogfundur millum leiðsluna í Skúlanum á Fløtum og umboð fyri mentamáladeildina. Eitt evni á fundinum var hølisviðurskiftini. Skúlin á Fløtum húsast í hesum seks eindum: í Kongagøtu (garðinum hjá Frk. Cohr), í Fríðrik Petersens gøtu, við Landavegin, á Frælsinum/Handan Á, á Argjavegi og í Gundadali.

Frá februar 2018 fer ein stova at vanta í í Gundadali, tí skúlin skal úr gamla húsinum hjá Fótbóltssambandinum. Í gamla húsinum er ein 8. flokkur, tað er ikki pláss fyri honum í hølunum, sum verða leigað í bygninginum hjá Fótbóltssambandinum.

Næmingatalið í komandi 9. 8. og 6. árgangi. er ov høgt. Hesir árgangir hava verið fýra spor, tá skúlarnir vórðu lagdir saman og so koma tvey spor aftrat úr Sankta Frans skúla, sostatt er neyðugt við hølum til ávikavist fýra og seks flokkar í hesum árgangum.

Tað er tørvur á einum høli á uml. 20 $m^2$ í veghædd til Litir í Leiki, tí tað riggar ikki so væl, at frítíðarskúli og Litir í Leiki hava tað eina fyribilshølið í Kongagøtu í felag, tí har eru stór og dýr ljóðføri inni.

Sum er, er skúlin á  nógvum matriklum, so tað er ikki ein loysn at finna høli aðrastaðni enn, har skúlin er framman undan. Skúlin hevur víst á møguleikan at fáa Realskúlan aftur, nú Heilsuhúsið flytur haðani.

Skúlastjórin hevur sent uppskot um eina loysn. Sambært hesum uppskoti, fær Skúlin á Fløtum  Realskúlan, og hann verður so brúktur til 3. flokk, og soleiðis verður øll grunddeildin savnað í Kongagøtu. Í hesum bygningi er eisini pláss fyri virkseminum hjá Litum í Leiki, sum nú er í tí eina fyribilshølinum í garðinum hjá frk. Cohr. Um forskúli verður stovnaður skúlaárið

2019/2020 hevði kanska borið til, at hann var í Realskúlanum saman við fyrsta flokki. Men ivasamt er, um tað er nóg gott pláss til tríggjar flokkar aftrat í bygninginum.

Um bert ein árgangur verður í Realskúlanum, so er pláss til annað virksemi eisini t.d. býarsavn.

Um skúlin fær ein part av Realskúlanum, soleiðis at pláss er fyri einum árgangi og Litum í Leiki har, so ber til at flyta úr Gundadali og siga leigumálið upp. Sambært leigusáttmálanum kann leigumálið tó í fyrsta lagi sigast upp til 01.04.2019.

Skúlin metir ikki, at tað er so umráðandi, at fótbóltsflokkarnir hava høli í Gundadali, tí tað er gott  busssamband og lætt at koma aftur og fram í sambandi við undirvísing og venjing á vøllunum í Gundadali.

Útreiðslurnar til leigu fyri hølini í Gundadali eru 24.540 kr. um mánaðin. Um tað ber til at siga leigumálið upp til juli 2018, so kann skúlin byrja at flyta, tá skrivligu próvtøkurnar eru síðst í mai og flyta útgerð og innbúgv úr hølunum. Skíggjar og talvur verða so settar upp í Kongagøtu, og neyðugt er ikki við nýíløgu til útgerð og innbúgv.

Skúlin og frítíðarskúlin hava skrivstovu í Móttøkuhúsinim, og heilsufrøðingurin hevur eisini høli har. Um skúlin fær høli í Realskúlanum, ber væntandi til at flyta úr Móttøkuhúsinum. Skrivstovurnar kunnu kanska vera á loftinum og heilsufrøðingurin í somu hølum, sum hann var í, tá skúlin var í Realskúlanum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at umrøða uppskotið.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti**

Foreldraumboðini í skúlastýrinum í Skúlanum á Fløtum taka undir við uppskotinum hjá skúlaleiðsluni, at Skúlin á Fløtum fær Realskúlan at ráða yvir, og umboðini heita í teldubrævið dagfest 11. desember 2017 á Tórshavnar kommunu at bera so bandi, at tað ber til at savna grunddeildina í miðbýnum.

Í teldubrævinum frá foreldraumboðunum í skúlastýrinum í Skúlanum á Fløtum stendur m.a. "Tað sum vit meta vera serliga átrokandi í hesum uppskoti er, at skúlin fær hølini í Realskúlanum saman við bygningunum í Kongagøtu at ráða yvir.
Vit meta, at tað er neyðugt at savna alla innskúlingina og tilboðini, ið eru tengd at henni, á einum stað.
Her hugsa vit um frítíðarskúlan, ein møguligan komandi forskúla, Litir í Leiki og at 1.-3.fl. ið náturliga hoyra saman, eru staðsettir saman."

Umsitingin metir ikki, at Realskúlin er egnaður til ein árgang á tríggjar flokkar umframt forskúla og mælir tí frá at skipa forskúla har.

3. flokkur skúlaárið 2018/2019 var í eindini á Frælsinum í fyrsta flokki, er fluttur í eindina Kongagøtu hetta skúlaárið og skal so flyta aftur næsta skúlaár, um skúlin ikki fær høli í Realskúlanum. Um so verður, verður skúlin á somu matriklum um nú, og 3. flokkur fer so væntandi í eindina í Fríðrik Petersensgøtu.

Uttan mun til hvat annað virksemi verður í Realskúlanum er umráðandi, at Litir í Leiki fær eitt høli í bygninginum, og hølið má vera í veghædd.

Tá 8. F skal úr gamla FSF húsinum í vár, flytur hann í eindina á Frælsinum. Tað er ikki besta loysnin, tí har verður hann saman við miðdeildini, tað sum er eftir av hesum skúlaárinum.

Um Skúlin á Fløtum fær Realskúlan, eru tveir møguleikar. Annar er at siga leigumálið við Fótbóltssambandið upp, og hin er, at skúlin fer úr eindin í Fríðrik Petersensgøtu, sum so kann brúkast til okkurt annað virksemi. Verður leigumálið sagt upp, so verða skúlaárið 2018/2019 fýra flokkar í eindini í Fríðrik Petersensgøtu. Tað verða ítróttaflokkarnir, sum verða tveir 8. flokkar og tveir 9. flokkar. Hinir flokkarnir í hesum árgangum verða antin í eindini á Frælsinum ella í eindini á Argjavegi. Skúlin hevur ikki tikið endaliga støðu til tað enn.

Til tess at fremja hesa ætlan, er neyðugt við ávísum tillagingum í bygninginum. Húsaumsitingin greiðir nærri frá neyðugu tillagingunum.

Víst verður í hesum sambandi eisini til mál 17/03897 Bráðfeingistørvur á dagstovnaplássum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at umrøða ætlanina við skúla í realskúlanum.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt.

**Ískoyti**
Síðan seinasta fund er komin teldupostur frá foreldraumboðunum í skúlastýrinum í Skúlanum á Fløtum við áheitan at lata Skúlan á Fløtum hava økið við Kongagøtu og Realskúlan í tvey ár afturat. Teldupostur dagfestur 24. januar 2018 við áheitanini er hjálagdur.

Umsitingin vísir til mál um bráðfeingis plásstørv á dagstovnøkinum j.nr. 17/03897, har avgjørt er, at dagstovnur verður skipaður í realskúlanum, harumframt eisini høli til Litir í leik hjá Skúlanum á Fløtum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin lata nevndini skrivið til kunningar.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Útsett.

**Mentamálanevndin 08. februar 2018:** Samtykt at heita á umsitingina at kanna møguleikan fyri at hýsa 3. flokki í Skúlanum á Fløtum í umhvørvinum við Kongagøtu og Finsen.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur kannað møguleikan at finna onnur høli í nánd av Skúlanum í Kongagøtu, soleiðis at øll grunddeildin í Skúlanum á Fløtum kann verða á einum stað.

Hølini í kjallaranum í Finsen út móti Tórsgøtu, sum eru ætlað til café, eru ikki tikin í nýtslu enn. (Tekning er hjáløgd). Har eru nøkur arbeiði, sum ikki eru liðug, t.d. ljós, el-stikk, radiatorar, partur av gólvinum og okkurt er eftir at mála. Samskifti er við Bústaðir um, at hesi arbeiðið verða gjørd. Haraftrat verður neyðugt at gera skilaveggir í café-økinum – ein við dupulthurð, ið býtir høli í tvey og ein út móti gongini. Hølini til undirvísing mugu lúka vanlig krøv til ljóðviðurskifti.

Um møguligt verður at leiga hesi høli til Skúlan á Fløtum, er neyðugt, at skúlin eisini fær høli 1.01 í Realskúlanum til undirvísing.

Ætlanin er, at tveir flokkar verða í Finsen og ein í Realskúlanum, og at Litir í Leiki kunnu so haraftrat brúka 1.01, tá flokkurin ikki brúkar tað hølið, og haraftrat gomlu sangstovuna í Finsen.

Í kjallaranum í Finsen verða tvey flokshøli (café-økið verður býtt sundur til tvey flokshøli), og gongin verður brúkt til felagsøki. Høvuðsinngongdin verður í tunlinum undir Auluni í Finsen, og hølið, sum er avmerkt til starvsfólk verður brúkt til bólka- og samrøðurúm. Hølið sum er avmerkt til inngongd til sunnaru stovuna.

Hølini mugu vera klár til undirvísing 15. august í 2018. Innbúgv og kt-útbúnaður skal bíleggjast. Veitingartíðin er uml. tríggjar mánaðir og uppsetingin eini tvær vikur, sostatt er neyðugt, at hølini eru klár 1. august.

S

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Tekstur kemur týsdagin.

**kúlin útvegar innbúgv og talvur til hølini í Realskúlanum og talvur til hølini í Finsen.**
**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Ískoyti**
Bústaðir bjóðar kommununi at leiga høli í Finsen til Skúlan á Fløtum. Leigumálið er fyri tvey ár. Leigukostnaður er ikki endaliga ásettur.

Litir í Leiki heldur í løtuni til í sangstovuni í Finsen, og tí er undirvísingin hjá Musikkskúlanum í kontrabassi eisini flutt úr fyribilshølunum í garðinum hjá Frk. Cohr og í sangstovuna í Finsen.

Um skúlin fær høli í Finsen og eitt høli í Realskúlanum, so øll grunddeildin verður savnað í umhvørvinum við Kongagøtu, eru tríggir møguleikar lýstir niðanfyri, um hvussu skúlin kann skipa grunddeildina.

*a. Fyrsti flokkur í Finsen*
Skúlaárið 2018/2019 eru 46 næmingar skrivaðir inn í fyrsta flokk í Skúlan á Fløtum, og er tað bert grundarlag fyri tveimum flokkum. Sostatt ber til, at fyrsti árgangur verður í hølunum í Finsen, og hinir báðir árgangirnir í grunddeildini verða verandi í Kongagøtu. Skúlin á Fløtum fær so eingi høli í Realskúlanum, og Litir í Leiki heldur fram í sangstovuni.

Vansin við hesi loysn er, at hon forðar fyri møguleikanum at stovna ein flokk aftrat í Skúlanum á Fløtum, um so skuldi verið, at næmingatalið veksur, og Mentamálaráðið játtar kommununi at stovna ein flokk aftrat í hesum árgangi.

Ein annar vansi er, at klædnagoymslan hjá frítíðarskúlanum er í Kongagøtu.

Aftrat hesum kemur, at skúlin hevur roknað við at kunna brúka starvsfólkarúmið í Kongagøtu til starvsfólk burtur av og ikki til serundirvísing, fundir o.a. Tí við hølunum í Finsen og í Realskúlanum var møguleiki at brúka tað eina undirvísingarhølið til serundirvísing, bólkarúm, fundir o.a.

Í Finsen er eitt rúm í lonini út móti Sjúrðargøtu, sum kann verða brúkt til serundirvísing. Vansin við tí er, at børnini skulu út fyri at koma til hølið. Tað er tó beint tvørtur um garðin, so úr skúlastovunum í Finsen er talan bert um at fara tvørtur um garðin, men úr bygninginum í Kongagøtu er nakra longri, og talan er jú um ta yngstu deildina í skúlanum.

*b. Triði flokkur í Finsen og Realskúlanum*
Næmingatalið 2018/2019 í triðja árgangi er 61, og talan er sostatt um tríggjar flokkar.

Fyrimunir eru, at 3. árgangur verður i Finsen og í 1.01 í Realskúlanum, tí hann er tann elsti árgangurin, kennir umhvørvið væl, megnar best at flyta seg í umráðnum, fara til felagstiltøk í bygninginum í Kongaøtu og fara oman í útiøkið hjá skúlanum og Grasagarð, hóast tað er eitt sindur longri at fara enn úr bygninginum í Kongagøtu.

Her ber eisini væl til at gera royndina, at tann eini flokkurin, Litir í Leiki-næmingarnir, verða í Realskúlanum í eini stovu við vanligum innbúgvi, sum skúlin tekur við úr eindini í Fríðriks Petersensgøtu. Møguleikin er so at gera royndir við øðrvísi innbúgvi í Finsen og brúka royndirnar frá tí, tá innbúgv verður keypt til nýggja bygningin úti á Fløtum.

Um 3. árgangur verður í Finsen og Realskúlanum, verður eitt flokshøli tøkt í Kongagøtu, sum so kann verða brúkt til serundirvísing, bólkarúm, fundarhøli o.a. Hesi høli mangla í eindini í Kongagøtu.

Vansarnir við hesi loysn eru, at 3. árgangur ikki er savnaður í sama bygningi, og at tann eini flokkurin heldur til í hølum í einum bygningi, sum ein dagstovnur er í. Tað er ivasamt, um tað er sambæriligt, at skúli og dagstovnur húsast í sama bygningi og so tætt hvørjum øðrum.

*c. Triði flokkur í Finsen*
Tað ber til at savna 3. árgang, um skúlin umframt hølini við caféøkið fær hølið í Finsen á horninum Tórsgøta/Sjúrðargøta til flokshøli. So verða allir tríggir flokkarnir í hesum árgangi á sama stað, og loysnin við hesum hølum gevur møguleika fyri betri samanhangi, tí hølini eru í sama bygningi, á somu hædd og inngongdin er úr sama tunli.

Við hesi loysn verður eisini tað eina hølið í Kongagøtu tøkt, og tað ber til at skipa serundirvísingsøkið har og bøta munandi um starvsfólkaviðurskiftini, soleiðis at starvsfólkarúmið verður starvsfólkarúm burtur av.

Henda loysnin ávirkar hølisviðurskiftini hjá Listgrafiska verkstaðnum, sum ætlanin var skuldi halda til í Finsen í hølinum á horninum móti Tórsgøtu/Sjúrðargøtu. Her er tó annar møguleiki, har Listgrafiska verkstaðið fær onnur høli í ovaru fimleikahøllini og tilhoyrandi hjáhølum í Finsen, sum ætlaði eru til myndlistaverkstøð (sí mál 17/01361).

*Annað*
Uttan mun til hvør loysnin verður, er neyðugt, at Litir í Leiki framhaldandi kann nýta sangstovuni í Finsen, til skúlin flytur á sumri 2020.

Tað verður ikki neyðugt at játta eyka til útreiðslur til el og hita til hølini í Finsen, tí skúlin hevur játtan til eindina í Fríðriks Petersensgøtu, og tær útreiðslurnar hevur skúlin ikki, tá hann flytur úr bygninginum.

Skúlin tekur ikki undir við loysn a: at fyrsti flokkur er í Finsen. Við hesi loysn missir skúlin munandi meir enn hann fær, sostatt gevur tað ikki meining at flyta úr eindini í Fríðriks Petersensgøtu, og skúlin vil so heldur halda fast við bygningin í Fríðriks Petersensgøtu. Tað triðja undirvísingarhølið er ein treyt, sum skúlin heldur fast við. Haraftrat metir skúlin, at tað er rættast, at fyrsti og annar árgangur eru í Kongagøtu, tí teir árgangirnar ganga í frítíðarskúla, og frítíðarskúlin brúkar eisini hølini í Kongagøtu.

Skúlin tekur heldur ikki undir við loysn b: at triði árgangur er í Finsen og í hølinum 1.01 í Realskúlanum, tí skúlin metir, at avbjóðingarnar við, at skúli og dagstovnur eru í sama bygningi, og hølini eru síð um síð, eru ov stórar.

Skúlin tekur undir við loysn c: at 3. árgangur fær caféøkið og hølið á horninum Tórsgøta/Sjúrðargøta í Finsen.

Skúlin leggur dent á, at hølisviðurskiftini hjá starvsfólkunum í Kongagøtu eru ikki í lagi, tí serundirvísing, starvsfólkarúm og fundarhøli eru í sama høli, eitt høli sum er 20 $m^2$ . Nú bert tveir 1. flokkar verða í Skúlanum á Fløtum, ber til at bøta um hesi viðurskifti við at skipa alt serøkið í eindini í Kongagøtu í einum flokshøli í Kongagøtu.

Samanumtikið tekur skúlin hvørki undir við loysn a ella b, skúlin tekur undir við loysn c., og um tað ikki ber til at fáa triðja flokshøli í Finsen, ynskir skúlin at verða verandi í Fríðriks Petersensgøtu.

Við loysn c. verður bygningurin í Fr. Petersensgøtu 9 tøkur til annað endamál.

Um avgjørt verður at fremja ætlanina at savna triðja árgang í Finsen, verður tørvur á fígging til ymiskt innbúgv o.a., umframt til leigukostna til Bústaðir fyri hølini. Leigukostnaðurin verður væntandi tøkur til fundin mánadagin. Til ein komandi fund kemur tilmæli um, hvussu útreiðslurnar kunnu fíggjast.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at savna triðja árgang í Finsen og at farið verður undir endaligar samráðingar við Bústaðir um avtalu í Finsen um leigu og ávísa innrætting av hølunum í caféøkinum og at leggja málið fyri aftur til komandi fund.

Tórshavnar kommuna útvegar innbúgv, amboð og gardinur til flokshølini í Finsen, innbúgv til

**Mentamálanevndin 23. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
karnapparnar, mottir og gaderobu við inngongdina. Kostnaðarmetingin fyri hetta er 300.000 k

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.
r.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Samráðingar hava verið við Bústaðir um innrætting og leigu, hølini talan er um eru 250 $m^2$. Uppskot er, at leigan verður 925 fyri $m^2$, hetta íroknað útreiðslurnar, ið Bústaðir hevur at innrætta hølini til skúlabrúks. Hølini í Finsen verða klár í august 2018. Innrættingarætlanin er góðkend av byggivaldinum.

Kostnaðarmeting til innbúgv skúlastovur, karnappar, garderobu, næmingaskáp, skáp til goymslu, gardinur og mottur er 300.000 kr. Ætlanin er, at hetta innbúgvið verður brúkt aftur í bygningin úti á Fløtum, tá skúlin flytur út hagar í 2020. Ætlanin er at keypa tvey ymisk sløg av stólum til næmingar umframt nøkur einkultborð, nøkur dupultborð og nøkur bólkaborð, so alt innbúgvið ikki er sama slag. Hetta gevur møguleika at innrætta stovurnar ymiskt, og at laga innbúgvið til ymsan tørv og ymiskt virksemi.

Av tí, at innbúgvið tvs. borð, stólar, skáp verður brúkt aftur í Skúlanum á Fløtum, verður mælt til at játta 300.000 kr. av játtanini til verkætlanina av 4176 Nýbygging skúlar (L41012).

Útreiðslurnar til leigu í 2018 eru 96.350 kr., tær verða býttar millum 4117 Skúlin á Fløtum og 4140 Ætlanir á skúlaøkinum. Í fíggjarætlan 2019 verður so lagt upp fyri, soleiðis at útreiðslurnar til leigu eru á játtanini hjá Skúlanum í Fløtum, og skúlin fær kompensatión fyri tann partin av leiguni, sum skúlin hevur goldið frá august til desember 2018.

Uppskot til leigusáttmála verður tøkt mánadagin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja

a) At gera leigusáttmála við Bústaðir um hølini í Finsen til skúlabrúks
b) At játta 300.000 kr. av 4176 Nýbygging skúlar (L41012) á konto 4117 Skúlin á Fløtum

og beina punkt a) í fíggjarnevndina og punkt b) í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Leigan fyri kjallaran í Finsen verður ætlandi greið innan medio mars. Ætlandi skal møguliga l

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir, sum eykajáttan.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, mæla til at finna eina loysn fyri Listagrafiska verkstaðið, áðrenn støða verður tikin til hetta mál.
eigumálið byrja 1. juli 2018.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Býráðslimirnir Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein skjóta upp, at Skúlin á Fløtum sleppur at disponera yvir gamla Realskúla, soleiðis at 1.-3. flokkur kann húsast í skúlanum í Kongagøtu og í Gamla Realskúla.

Ætlanin um at innrætta Gamla realskúla til dagstovn eigur tí at verða endurskoðað soleiðis, at frítíðarskúli verður staðsettur á øðrum staði. Alt hetta so leingi sum byggingin av skúlanum á Fløtum er ávegis. Tá ið Skúlin á Fløtum flytir út á Fløtir, er støðan ein onnur.

Grundgevingar okkara fyri hesum uppskoti til viðgerðar og avgerðar er, at vit halda at Skúlin á Fløtum eigur rætt til at nýta Gamla realskúla. Talan er í hesum føri um tíðaravmarkaða loysn, sum eisini gevur Býráðnum stundir til at finna út av endaliga, hvat Gamli realskúli skal brúkast til.

Vit taka at heilum huga undir við, at Skúlin á Fløtum skal kunna hýsa 1.-3. flokk í hølum kring Gamla Kommunuskúlan, og samstundis vilja vit vísa á ta sannroynd, at íbúgvarnir í Finsen ikki halda tað vera eitt gott hugskot at skúli flytir inn í kjallaran har.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Atkvøtt varð um ískoytið frá Helenu Dam á Neystabø, Hallu Samuelsen, Heðini Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Tróndi Sigurðsson og Annfinn Brekkstein til býráðsfundin 20. juni 2018, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtykt á fundi mentamálanevndini 14. mai 2018 og samtykt í fíggjanevndini 18. mai 2018. Nevndirnar hava samtykt at játta 300.000 kr. av 4176 Nýbygging skúlar (L41012) á konto 4117 Skúlin á Fløtum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og fíggjarnevndini og samtykkja at játta 300.000 kr. av 4176 Nýbygging skúlar (L41012) á konto 4117 Skúlin á Fløtum.

Á fundinum verður greitt frá tilgongdini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Tekstur kemur týsdagin.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Ískoyti**
Bústaðir bjóðar kommununi at leiga høli í Finsen til Skúlan á Fløtum. Leigumálið er fyri tvey ár. Leigukostnaður er ikki endaliga ásettur.

Litir í Leiki heldur í løtuni til í sangstovuni í Finsen, og tí er undirvísingin hjá Musikkskúlanum í kontrabassi eisini flutt úr fyribilshølunum í garðinum hjá Frk. Cohr og í sangstovuna í Finsen.

Um skúlin fær høli í Finsen og eitt høli í Realskúlanum, so øll grunddeildin verður savnað í umhvørvinum við Kongagøtu, eru tríggir møguleikar lýstir niðanfyri, um hvussu skúlin kann skipa grunddeildina.

*a. Fyrsti flokkur í Finsen*
Skúlaárið 2018/2019 eru 46 næmingar skrivaðir inn í fyrsta flokk í Skúlan á Fløtum, og er tað bert grundarlag fyri tveimum flokkum. Sostatt ber til, at fyrsti árgangur verður í hølunum í Finsen, og hinir báðir árgangirnir í grunddeildini verða verandi í Kongagøtu. Skúlin á Fløtum fær so eingi høli í Realskúlanum, og Litir í Leiki heldur fram í sangstovuni.

Vansin við hesi loysn er, at hon forðar fyri møguleikanum at stovna ein flokk aftrat í Skúlanum á Fløtum, um so skuldi verið, at næmingatalið veksur, og Mentamálaráðið játtar kommununi at stovna ein flokk aftrat í hesum árgangi.

Ein annar vansi er, at klædnagoymslan hjá frítíðarskúlanum er í Kongagøtu.

Aftrat hesum kemur, at skúlin hevur roknað við at kunna brúka starvsfólkarúmið í Kongagøtu til starvsfólk burtur av og ikki til serundirvísing, fundir o.a. Tí við hølunum í Finsen og í Realskúlanum var møguleiki at brúka tað eina undirvísingarhølið til serundirvísing, bólkarúm, fundir o.a.

Í Finsen er eitt rúm í lonini út móti Sjúrðargøtu, sum kann verða brúkt til serundirvísing. Vansin við tí er, at børnini skulu út fyri at koma til hølið. Tað er tó beint tvørtur um garðin, so úr skúlastovunum í Finsen er talan bert um at fara tvørtur um garðin, men úr bygninginum í Kongagøtu er nakra longri, og talan er jú um ta yngstu deildina í skúlanum.

*b. Triði flokkur í Finsen og Realskúlanum*
Næmingatalið 2018/2019 í triðja árgangi er 61, og talan er sostatt um tríggjar flokkar.

Fyrimunir eru, at 3. árgangur verður i Finsen og í 1.01 í Realskúlanum, tí hann er tann elsti árgangurin, kennir umhvørvið væl, megnar best at flyta seg í umráðnum, fara til felagstiltøk í bygninginum í Kongaøtu og fara oman í útiøkið hjá skúlanum og Grasagarð, hóast tað er eitt sindur longri at fara enn úr bygninginum í Kongagøtu.

Her ber eisini væl til at gera royndina, at tann eini flokkurin, Litir í Leiki-næmingarnir, verða í Realskúlanum í eini stovu við vanligum innbúgvi, sum skúlin tekur við úr eindini í Fríðriks Petersensgøtu. Møguleikin er so at gera royndir við øðrvísi innbúgvi í Finsen og brúka royndirnar frá tí, tá innbúgv verður keypt til nýggja bygningin úti á Fløtum.

Um 3. árgangur verður í Finsen og Realskúlanum, verður eitt flokshøli tøkt í Kongagøtu, sum so kann verða brúkt til serundirvísing, bólkarúm, fundarhøli o.a. Hesi høli mangla í eindini í Kongagøtu.

Vansarnir við hesi loysn eru, at 3. árgangur ikki er savnaður í sama bygningi, og at tann eini flokkurin heldur til í hølum í einum bygningi, sum ein dagstovnur er í. Tað er ivasamt, um tað er sambæriligt, at skúli og dagstovnur húsast í sama bygningi og so tætt hvørjum øðrum.

*c. Triði flokkur í Finsen*
Tað ber til at savna 3. árgang, um skúlin umframt hølini við caféøkið fær hølið í Finsen á horninum Tórsgøta/Sjúrðargøta til flokshøli. So verða allir tríggir flokkarnir í hesum árgangi á sama stað, og loysnin við hesum hølum gevur møguleika fyri betri samanhangi, tí hølini eru í sama bygningi, á somu hædd og inngongdin er úr sama tunli.

Við hesi loysn verður eisini tað eina hølið í Kongagøtu tøkt, og tað ber til at skipa serundirvísingsøkið har og bøta munandi um starvsfólkaviðurskiftini, soleiðis at starvsfólkarúmið verður starvsfólkarúm burtur av.

Henda loysnin ávirkar hølisviðurskiftini hjá Listgrafiska verkstaðnum, sum ætlanin var skuldi halda til í Finsen í hølinum á horninum móti Tórsgøtu/Sjúrðargøtu. Her er tó annar møguleiki, har Listgrafiska verkstaðið fær onnur høli í ovaru fimleikahøllini og tilhoyrandi hjáhølum í Finsen, sum ætlaði eru til myndlistaverkstøð (sí mál 17/01361).

<u>*Annað*</u>
Uttan mun til hvør loysnin verður, er neyðugt, at Litir í Leiki framhaldandi kann nýta sangstovuni í Finsen, til skúlin flytur á sumri 2020.

Tað verður ikki neyðugt at játta eyka til útreiðslur til el og hita til hølini í Finsen, tí skúlin hevur játtan til eindina í Fríðriks Petersensgøtu, og tær útreiðslurnar hevur skúlin ikki, tá hann flytur úr bygninginum.

Skúlin tekur ikki undir við loysn a: at fyrsti flokkur er í Finsen. Við hesi loysn missir skúlin munandi meir enn hann fær, sostatt gevur tað ikki meining at flyta úr eindini í Fríðriks Petersensgøtu, og skúlin vil so heldur halda fast við bygningin í Fríðriks Petersensgøtu. Tað triðja undirvísingarhølið er ein treyt, sum skúlin heldur fast við. Haraftrat metir skúlin, at tað er rættast, at fyrsti og annar árgangur eru í Kongagøtu, tí teir árgangirnar ganga í frítíðarskúla, og frítíðarskúlin brúkar eisini hølini í Kongagøtu.

Skúlin tekur heldur ikki undir við loysn b: at triði árgangur er í Finsen og í hølinum 1.01 í Realskúlanum, tí skúlin metir, at avbjóðingarnar við, at skúli og dagstovnur eru í sama bygningi, og hølini eru síð um síð, eru ov stórar.

Skúlin tekur undir við loysn c: at 3. árgangur fær caféøkið og hølið á horninum Tórsgøta/Sjúrðargøta í Finsen.

Skúlin leggur dent á, at hølisviðurskiftini hjá starvsfólkunum í Kongagøtu eru ikki í lagi, tí serundirvísing, starvsfólkarúm og fundarhøli eru í sama høli, eitt høli sum er 20 $m^2$ . Nú bert tveir 1. flokkar verða í Skúlanum á Fløtum, ber til at bøta um hesi viðurskifti við at skipa alt serøkið í eindini í Kongagøtu í einum flokshøli í Kongagøtu.

Samanumtikið tekur skúlin hvørki undir við loysn a ella b, skúlin tekur undir við loysn c., og um tað ikki ber til at fáa triðja flokshøli í Finsen, ynskir skúlin at verða verandi í Fríðriks Petersensgøtu.

Við loysn c. verður bygningurin í Fr. Petersensgøtu 9 tøkur til annað endamál.

Um avgjørt verður at fremja ætlanina at savna triðja árgang í Finsen, verður tørvur á fígging til ymiskt innbúgv o.a., umframt til leigukostna til Bústaðir fyri hølini. Leigukostnaðurin verður væntandi tøkur til fundin mánadagin. Til ein komandi fund kemur tilmæli um, hvussu útreiðslurnar kunnu fíggjast.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at savna triðja árgang í Finsen og at farið verður undir endaligar samráðingar við Bústaðir um avtalu í Finsen um leigu og ávísa innrætting av hølunum í caféøkinum og at leggja málið fyri aftur til komandi fund.

**Mentamálanevndin 23. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Samráðingar hava verið við Bústaðir um innrætting og leigu, hølini talan er um eru 250 $m^2$. Uppskot er, at leigan verður 925 fyri $m^2$, hetta íroknað útreiðslurnar, ið Bústaðir hevur at innrætta hølini til skúlabrúks. Hølini í Finsen verða klár í august 2018. Innrættingarætlanin er góðkend av byggivaldinum.

Kostnaðarmeting til innbúgv skúlastovur, karnappar, garderobu, næmingaskáp, skáp til goymslu, gardinur og mottur er 300.000 kr. Ætlanin er, at hetta innbúgvið verður brúkt aftur í bygningin úti á Fløtum, tá skúlin flytur út hagar í 2020. Ætlanin er at keypa tvey ymisk sløg av stólum til næmingar umframt nøkur einkultborð, nøkur dupultborð og nøkur bólkaborð, so alt innbúgvið ikki er sama slag. Hetta gevur møguleika at innrætta stovurnar ymiskt, og at laga innbúgvið til ymsan tørv og ymiskt virksemi.

Av tí, at innbúgvið tvs. borð, stólar, skáp verður brúkt aftur í Skúlanum á Fløtum, verður mælt til at játta 300.000 kr. av játtanini til verkætlanina av 4176 Nýbygging skúlar (L41012).

Útreiðslurnar til leigu í 2018 eru 96.350 kr., tær verða býttar millum 4117 Skúlin á Fløtum og 4140 Ætlanir á skúlaøkinum. Í fíggjarætlan 2019 verður so lagt upp fyri, soleiðis at útreiðslurnar til leigu eru á játtanini hjá Skúlanum í Fløtum, og skúlin fær kompensatión fyri tann partin av leiguni, sum skúlin hevur goldið frá august til desember 2018.

Uppskot til leigusáttmála verður tøkt mánadagin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja

c) At gera leigusáttmála við Bústaðir um hølini í Finsen til skúlabrúks
d) At játta 300.000 kr. av 4176 Nýbygging skúlar (L41012) á konto 4117 Skúlin á Fløtum

og beina punkt a) í fíggjarnevndina og punkt b) í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir, sum eykajáttan.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, mæla til at finna eina loysn fyri Listagrafiska verkstaðið, áðrenn støða verður tikin til hetta mál.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Býráðslimirnir Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein skjóta upp, at Skúlin á Fløtum sleppur at disponera yvir gamla Realskúla, soleiðis at 1.-3. flokkur kann húsast í skúlanum í Kongagøtu og í Gamla Realskúla.

Ætlanin um at innrætta Gamla realskúla til dagstovn eigur tí at verða endurskoðað soleiðis, at frítíðarskúli verður staðsettur á øðrum staði. Alt hetta so leingi sum byggingin av skúlanum á Fløtum er ávegis. Tá ið Skúlin á Fløtum flytir út á Fløtir, er støðan ein onnur.

Grundgevingar okkara fyri hesum uppskoti til viðgerðar og avgerðar er, at vit halda at Skúlin á Fløtum eigur rætt til at nýta Gamla realskúla. Talan er í hesum føri um tíðaravmarkaða loysn, sum eisini gevur Býráðnum stundir til at finna út av endaliga, hvat Gamli realskúli skal brúkast til.

Vit taka at heilum huga undir við, at Skúlin á Fløtum skal kunna hýsa 1.-3. flokk í hølum kring Gamla Kommunuskúlan, og samstundis vilja vit vísa á ta sannroynd, at íbúgvarnir í Finsen ikki halda tað vera eitt gott hugskot at skúli flytir inn í kjallaran har.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Atkvøtt varð um ískoytið frá Helenu Dam á Neystabø, Hallu Samuelsen, Heðini Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Tróndi Sigurðsson og Annfinn Brekkstein til býráðsfundin 20. juni 2018, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtykt á fundi mentamálanevndini 14. mai 2018 og samtykt í fíggjanevndini 18. mai 2018. Nevndirnar hava samtykt at játta 300.000 kr. av 4176 Nýbygging skúlar (L41012) á konto 4117 Skúlin á Fløtum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og fíggjarnevndini og samtykkja at játta 300.000 kr. av 4176 Nýbygging skúlar (L41012) á konto 4117 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Tekstur kemur týsdagin.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Ískoyti**
Bústaðir bjóðar kommununi at leiga høli í Finsen til Skúlan á Fløtum. Leigumálið er fyri tvey ár. Leigukostnaður er ikki endaliga ásettur.

Litir í Leiki heldur í løtuni til í sangstovuni í Finsen, og tí er undirvísingin hjá Musikkskúlanum í kontrabassi eisini flutt úr fyribilshølunum í garðinum hjá Frk. Cohr og í sangstovuna í Finsen.

Um skúlin fær høli í Finsen og eitt høli í Realskúlanum, so øll grunddeildin verður savnað í umhvørvinum við Kongagøtu, eru tríggir møguleikar lýstir niðanfyri, um hvussu skúlin kann skipa grunddeildina.

*a. Fyrsti flokkur í Finsen*
Skúlaárið 2018/2019 eru 46 næmingar skrivaðir inn í fyrsta flokk í Skúlan á Fløtum, og er tað bert grundarlag fyri tveimum flokkum. Sostatt ber til, at fyrsti árgangur verður í hølunum í Finsen, og hinir báðir árgangirnir í grunddeildini verða verandi í Kongagøtu. Skúlin á Fløtum fær so eingi høli í Realskúlanum, og Litir í Leiki heldur fram í sangstovuni.

Vansin við hesi loysn er, at hon forðar fyri møguleikanum at stovna ein flokk aftrat í Skúlanum á Fløtum, um so skuldi verið, at næmingatalið veksur, og Mentamálaráðið játtar kommununi at stovna ein flokk aftrat í hesum árgangi.

Ein annar vansi er, at klædnagoymslan hjá frítíðarskúlanum er í Kongagøtu.

Aftrat hesum kemur, at skúlin hevur roknað við at kunna brúka starvsfólkarúmið í Kongagøtu til starvsfólk burtur av og ikki til serundirvísing, fundir o.a. Tí við hølunum í Finsen og í Realskúlanum var møguleiki at brúka tað eina undirvísingarhølið til serundirvísing, bólkarúm, fundir o.a.

Í Finsen er eitt rúm í lonini út móti Sjúrðargøtu, sum kann verða brúkt til serundirvísing. Vansin við tí er, at børnini skulu út fyri at koma til hølið. Tað er tó beint tvørtur um garðin, so úr skúlastovunum í Finsen er talan bert um at fara tvørtur um garðin, men úr bygninginum í Kongagøtu er nakra longri, og talan er jú um ta yngstu deildina í skúlanum.

*b. Triði flokkur í Finsen og Realskúlanum*
Næmingatalið 2018/2019 í triðja árgangi er 61, og talan er sostatt um tríggjar flokkar.

Fyrimunir eru, at 3. árgangur verður i Finsen og í 1.01 í Realskúlanum, tí hann er tann elsti árgangurin, kennir umhvørvið væl, megnar best at flyta seg í umráðnum, fara til felagstiltøk í bygninginum í Kongaøtu og fara oman í útiøkið hjá skúlanum og Grasagarð, hóast tað er eitt sindur longri at fara enn úr bygninginum í Kongagøtu.

Her ber eisini væl til at gera royndina, at tann eini flokkurin, Litir í Leiki-næmingarnir, verða í Realskúlanum í eini stovu við vanligum innbúgvi, sum skúlin tekur við úr eindini í Fríðriks Petersensgøtu. Møguleikin er so at gera royndir við øðrvísi innbúgvi í Finsen og brúka royndirnar frá tí, tá innbúgv verður keypt til nýggja bygningin úti á Fløtum.

Um 3. árgangur verður í Finsen og Realskúlanum, verður eitt flokshøli tøkt í Kongagøtu, sum so kann verða brúkt til serundirvísing, bólkarúm, fundarhøli o.a. Hesi høli mangla í eindini í Kongagøtu.

Vansarnir við hesi loysn eru, at 3. árgangur ikki er savnaður í sama bygningi, og at tann eini flokkurin heldur til í hølum í einum bygningi, sum ein dagstovnur er í. Tað er ivasamt, um tað er sambæriligt, at skúli og dagstovnur húsast í sama bygningi og so tætt hvørjum øðrum.

*c. Triði flokkur í Finsen*
Tað ber til at savna 3. árgang, um skúlin umframt hølini við caféøkið fær hølið í Finsen á horninum Tórsgøta/Sjúrðargøta til flokshøli. So verða allir tríggir flokkarnir í hesum árgangi á sama stað, og loysnin við hesum hølum gevur møguleika fyri betri samanhangi, tí hølini eru í sama bygningi, á somu hædd og inngongdin er úr sama tunli.

Við hesi loysn verður eisini tað eina hølið í Kongagøtu tøkt, og tað ber til at skipa serundirvísingsøkið har og bøta munandi um starvsfólkaviðurskiftini, soleiðis at starvsfólkarúmið verður starvsfólkarúm burtur av.

Henda loysnin ávirkar hølisviðurskiftini hjá Listgrafiska verkstaðnum, sum ætlanin var skuldi halda til í Finsen í hølinum á horninum móti Tórsgøtu/Sjúrðargøtu. Her er tó annar møguleiki, har Listgrafiska verkstaðið fær onnur høli í ovaru fimleikahøllini og tilhoyrandi hjáhølum í Finsen, sum ætlaði eru til myndlistaverkstøð (sí mál 17/01361).

*Annað*
Uttan mun til hvør loysnin verður, er neyðugt, at Litir í Leiki framhaldandi kann nýta sangstovuni í Finsen, til skúlin flytur á sumri 2020.

Tað verður ikki neyðugt at játta eyka til útreiðslur til el og hita til hølini í Finsen, tí skúlin hevur játtan til eindina í Fríðriks Petersensgøtu, og tær útreiðslurnar hevur skúlin ikki, tá hann flytur úr bygninginum.

Skúlin tekur ikki undir við loysn a: at fyrsti flokkur er í Finsen. Við hesi loysn missir skúlin munandi meir enn hann fær, sostatt gevur tað ikki meining at flyta úr eindini í Fríðriks Petersensgøtu, og skúlin vil so heldur halda fast við bygningin í Fríðriks Petersensgøtu. Tað triðja undirvísingarhølið er ein treyt, sum skúlin heldur fast við. Haraftrat metir skúlin, at tað er rættast, at fyrsti og annar árgangur eru í Kongagøtu, tí teir árgangirnar ganga í frítíðarskúla, og frítíðarskúlin brúkar eisini hølini í Kongagøtu.

Skúlin tekur heldur ikki undir við loysn b: at triði árgangur er í Finsen og í hølinum 1.01 í Realskúlanum, tí skúlin metir, at avbjóðingarnar við, at skúli og dagstovnur eru í sama bygningi, og hølini eru síð um síð, eru ov stórar.

Skúlin tekur undir við loysn c: at 3. árgangur fær caféøkið og hølið á horninum Tórsgøta/Sjúrðargøta í Finsen.

Skúlin leggur dent á, at hølisviðurskiftini hjá starvsfólkunum í Kongagøtu eru ikki í lagi, tí serundirvísing, starvsfólkarúm og fundarhøli eru í sama høli, eitt høli sum er 20 $m^2$ . Nú bert tveir 1. flokkar verða í Skúlanum á Fløtum, ber til at bøta um hesi viðurskifti við at skipa alt serøkið í eindini í Kongagøtu í einum flokshøli í Kongagøtu.

Samanumtikið tekur skúlin hvørki undir við loysn a ella b, skúlin tekur undir við loysn c., og um tað ikki ber til at fáa triðja flokshøli í Finsen, ynskir skúlin at verða verandi í Fríðriks Petersensgøtu.

Við loysn c. verður bygningurin í Fr. Petersensgøtu 9 tøkur til annað endamál.

Um avgjørt verður at fremja ætlanina at savna triðja árgang í Finsen, verður tørvur á fígging til ymiskt innbúgv o.a., umframt til leigukostna til Bústaðir fyri hølini. Leigukostnaðurin verður væntandi tøkur til fundin mánadagin. Til ein komandi fund kemur tilmæli um, hvussu útreiðslurnar kunnu fíggjast.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at savna triðja árgang í Finsen og at farið verður undir endaligar samráðingar við Bústaðir um avtalu í Finsen um leigu og ávísa innrætting av hølunum í caféøkinum og at leggja málið fyri aftur til komandi fund.

**Mentamálanevndin 23. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Samráðingar hava verið við Bústaðir um innrætting og leigu, hølini talan er um eru 250 $m^2$. Uppskot er, at leigan verður 925 fyri $m^2$, hetta íroknað útreiðslurnar, ið Bústaðir hevur at innrætta hølini til skúlabrúks. Hølini í Finsen verða klár í august 2018. Innrættingarætlanin er góðkend av byggivaldinum.

Kostnaðarmeting til innbúgv skúlastovur, karnappar, garderobu, næmingaskáp, skáp til goymslu, gardinur og mottur er 300.000 kr. Ætlanin er, at hetta innbúgvið verður brúkt aftur í bygningin úti á Fløtum, tá skúlin flytur út hagar í 2020. Ætlanin er at keypa tvey ymisk sløg av stólum til næmingar umframt nøkur einkultborð, nøkur dupultborð og nøkur bólkaborð, so alt innbúgvið ikki er sama slag. Hetta gevur møguleika at innrætta stovurnar ymiskt, og at laga innbúgvið til ymsan tørv og ymiskt virksemi.

Av tí, at innbúgvið tvs. borð, stólar, skáp verður brúkt aftur í Skúlanum á Fløtum, verður mælt til at játta 300.000 kr. av játtanini til verkætlanina av 4176 Nýbygging skúlar (L41012).

Útreiðslurnar til leigu í 2018 eru 96.350 kr., tær verða býttar millum 4117 Skúlin á Fløtum og 4140 Ætlanir á skúlaøkinum. Í fíggjarætlan 2019 verður so lagt upp fyri, soleiðis at útreiðslurnar til leigu eru á játtanini hjá Skúlanum í Fløtum, og skúlin fær kompensatión fyri tann partin av leiguni, sum skúlin hevur goldið frá august til desember 2018.

Uppskot til leigusáttmála verður tøkt mánadagin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja

e) At gera leigusáttmála við Bústaðir um hølini í Finsen til skúlabrúks
f) At játta 300.000 kr. av 4176 Nýbygging skúlar (L41012) á konto 4117 Skúlin á Fløtum

og beina punkt a) í fíggjarnevndina og punkt b) í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir, sum eykajáttan.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, mæla til at finna eina loysn fyri Listagrafiska verkstaðið, áðrenn støða verður tikin til hetta mál.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Býráðslimirnir Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein skjóta upp, at Skúlin á Fløtum sleppur at disponera yvir gamla Realskúla, soleiðis at 1.-3. flokkur kann húsast í skúlanum í Kongagøtu og í Gamla Realskúla.

Ætlanin um at innrætta Gamla realskúla til dagstovn eigur tí at verða endurskoðað soleiðis, at frítíðarskúli verður staðsettur á øðrum staði. Alt hetta so leingi sum byggingin av skúlanum á Fløtum er ávegis. Tá ið Skúlin á Fløtum flytir út á Fløtir, er støðan ein onnur.

Grundgevingar okkara fyri hesum uppskoti til viðgerðar og avgerðar er, at vit halda at Skúlin á Fløtum eigur rætt til at nýta Gamla realskúla. Talan er í hesum føri um tíðaravmarkaða loysn, sum eisini gevur Býráðnum stundir til at finna út av endaliga, hvat Gamli realskúli skal brúkast til.

Vit taka at heilum huga undir við, at Skúlin á Fløtum skal kunna hýsa 1.-3. flokk í hølum kring Gamla Kommunuskúlan, og samstundis vilja vit vísa á ta sannroynd, at íbúgvarnir í Finsen ikki halda tað vera eitt gott hugskot at skúli flytir inn í kjallaran har.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Atkvøtt varð um ískoytið frá Helenu Dam á Neystabø, Hallu Samuelsen, Heðini Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Tróndi Sigurðsson og Annfinn Brekkstein til býráðsfundin 20. juni 2018, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtykt á fundi mentamálanevndini 14. mai 2018 og samtykt í fíggjanevndini 18. mai 2018. Nevndirnar hava samtykt at játta 300.000 kr. av 4176 Nýbygging skúlar (L41012) á konto 4117 Skúlin á Fløtum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og fíggjarnevndini og samtykkja at játta 300.000 kr. av 4176 Nýbygging skúlar (L41012) á konto 4117 Skúlin á Fløtum.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt**.**

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt**.**

# 242/18 Nýggj stórhøll (multiarena) til ítrótta- og mentanarendamál

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.10.2018 | 290/18 | 18/02895-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 289/18 | 18/02895-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.10.2018 | 208/18 | 18/02895-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 24.10.2018 | 299/18 | 18/02895-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 242/18 | 18/02895-1 |

**Upprunin til málið:**
Annika Olsen, borgarstjóri og Gunvør Balle, forkvinna í mentamálanevndini.

**Samandráttur**
Til framtíðar tørv og menning innan ítrótt og mentan er tørvur á at taka innleiðandi stigini til ráðlegging av eini stórhøll í Tórshavnar kommunu, ið skal skapa karmar fyri og mynda týðandi kappingar og hendingar í 20'unum og framyvir.

Endamálið við málinum er í fyrstu atløgu at fáa gjørt innleiðandi kravfesting til eina nýggja stórhøll og í øðrum lagi fáa fastlagt eina hóskandi staðseting.

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna sum høvuðsstaður og Føroyar sum land eru í støðugari menning innan alskyns øki. Innan ítróttin hava Føroyar vunnið seg nógv fram, umframt at menningin og tørvurin á góðum kørmum til mentanartiltøk eisini er vaksandi, bæði vegna økt fólkatal og alsamt størri vavi og áhuga fyri ítrótti á ymiskum stigi. Kommunan hevur farnu árini gjørt týðandi íløgur í ítrótta- og mentanarinfrakervi eitt nú við útbyggingini av Høllini á Hálsi, Høllini á Argjahamri og komandi høllini á Fløtum, umframt fótbóltsvølli í Hoyvík og serstøku verkætlanini Tórsvøllur, umframt ætlanirnar við langhyli og golfvølli næstu árini o.a.

Øll hesi eru við til at stuðla undir tiltøk í fremstu røð, soleiðis at Tórshavn og Føroyar vinna sær sítt pláss í millum aðrar høvuðsstaðir og lond og harvið eisini stuðla undir, at føroysk ítrótt bæði varðveitir og vinnir altjóða viðurkenning. Í visjónini fyri Tórshavnar kommunu er m.a. ásett at okkara høvuðsstaður skal vera virkin og vakin; at vera ein vakstrardepil í Norðuratlantshavi, umframt at vera alheimsgjørdur og fjølbroyttur og ikki minst at høvuðsstaðurin er livandi við upplivingum og avbjóðingum, men eisini við tryggleika og nærleika.

Tey frambrotini, ið eru hend farnu árini og sum vónandi gerast enn fleiri komandi árini krevja leypandi útbyggingar av infrakerinum. Eitt nú eru stigvíst hækkandi krøv alt eftir, hvussu væl t.d. hondbólturin og flogbólturin klárar seg eins og fimleikurin v.m. Ein týðandi veruleiki innan ítrótt í dag er miðlan av ítróttatiltøkum. Ein partur av fíggingini kemur frá sjónvarpsrættindum o.a. og har setur tað krøv til hallirnar. Eitt nú lýkur Høllin á Hálsi ikki øll krøv til slíkar kappingar á hægsta stigi eins og útbyggingin av Tórsvølli til altjóða stadion er neyðug fyri at fáa hægstu flokking av leikvøllinum og harvið møguleikan at leika altjóða dyst í Føroyum.

Mett verður hóskandi at fara undir neyvari ráðlegging av eini stórhøll til ítrótta- og mentanarendamál (multiarena) og har fáa nærri greiði á framtíðar staðseting, yvirskipað innihald, tíðar- og kostnaðarætlan, umframt uppskot til fígging. Ein slík stórhøll er ætlað til alskyns endamál og er tí viðkomandi at kanna um aðrir samstarvsfelagar kunnu vera í fíggingini, tað veri seg vinnufyritøkur, fíggingarstovnar, grunnar og landsstýrið.

Fyrsta stigið er at fáa gjørt eina kravfesting til, hvussu og hvørjir tørvir (herundir hvørjar ítróttagreinar) og karmar høllin yvirskipað skal hava og við støði í tí fáa funnið hóskandi uppskot til staðsetingar. Hetta kann fara í gongd í heyst og vera klárt til ársskiftið.

Talan verður um fylgjandi stig:
- Seta fyrireikingarnevnd við umboðum fyri viðkomandi fyrisitingar.
- Fara undir arbeiðið við at gera kravfesting til stórhøllina
- At koma við uppskotum til hóskandi staðsetingar
- Gera meting um møguliga fígging frá øðrum pørtum, herundir landinum, vinnuni, grunnum o.ø.

Hetta innleiðandi arbeiðið verður fíggjað av vanliga rakstrinum hjá fyrisitingunum.

Tá hetta arbeiðið er liðugt kann støða takast til um farast skal víðari við at útvega lendið og um farast skal undir at gera eina byggiskrá.

Staðseting av slíkari høll er málsøkið hjá Byggi- og býarskipanarnevndini, meðan ítróttur er málsøkið hjá mentamálanevndini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ikki viðkomandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ikki viðkomandi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/03468 Skipan av Stórutjørn.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongir.

**Umhvørvisárin**
Ongi í hesum umfari.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar í hesum umfari.

**Skjøl**
Ávegis

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, virkandi tekniski stjóri, býararkitekturin, leiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at fara undir at gera kravfesting til eina komandi stórhøll og koma við uppskotum til staðseting. Málið verður beint í Byggi- og býarskipanarnevndina og býráðið.

**Mentamálanevndin 03. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Tað er av stórum týdningi, at stórhøllin við øllum teimum møguleikunum, ein tílík høll hevur, verður staðsett skynsamt í mun til infrakervi, soleiðis at Føroya fólk hevur lætta atgongd til tey tiltøk og teir hentleikar høllin gevur.

Býarskipanarliga verður mett, at rætta staðsetingin av hesi høllini er í økinum við Stórutjørn, har innkomuvegurin til Havnina verður, og har høllin kemur at verða partur av framtíðar útbyggingini av býnum/kommununi.

Arbeiðið at skipa økið við Stórutjørn er ávegis, og er ætlanin, at økið skal fevna um bústaðir, smávinnu, ítrótt og rekreativ øki. Hvar í økinum nýggja stórhøllin skal staðsetast, kann ikki sigast í núverandi løtu, men vendir umsitingin aftur við neyvari staðseting, tá økið er endaliga skipað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at stórhøllin verður staðsett í økinum við Stórutjørn og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2018:** Ein samd nevnd tekur undir við Mentamálanevndini.

Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle, tekur undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum frá Byggi- og býarskipanarnevndini og mælir til at finna aðra staðseting, sum er við rennibreytina og endan á R. C. Effersøesgøtu og at taka upp samráðingar við eigaran av nevnda lendi.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Fyrst varð atkvøtt fyri tilmælinum frá einari samdari fíggjarnevnd, ið varð einmælt samtykt.

Síðani varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá Heðini Mortensen og Trónda Sigurðsson, sum mæla til at finna aðra staðseting, sum er við rennibreytina og R. C. Effersøesgøtu og at taka upp samráðingar við eigaran av nevnda lendi, ið fall við 5 atkvøðum fyri, 7 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælið hjá Anniku Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, sum tekur undir við tilmælinum hjá byggi- og byarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 5 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Sjúrður Olsen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

[Lagre]

# 243/18 Umsókn um keyp av øki burtur av matr. nr. 139b, Hoyvík til bygging av einum biogassanleggi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 73/18 | 18/00908-5 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 94/18 | 18/00908-5 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 110/18 | 18/00908-5 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 93/18 | 18/00908-5 |
| 5 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 194/18 | 18/00908-5 |
| 6 Fíggjarnevndin | 24.10.2018 | 302/18 | 18/00908-5 |
| 7 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 243/18 | 18/00908-5 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Við skrivi 22.03.2017 søkir Christian Andreasen, advokatur, vegna P/f Salmon Protein um, at felagið fær til keyps umleið 20.000 $m^2$ burtur av matr.nr. 139b, Hoyvík.

Ætlanin er at nýta stykkið til bygging av einum biogass anleggi, sum skal taka ímóti úrdráttum frá alivinnuni, sambært teimum reglum, sum eru galdandi fyri alivinnuna viðvíkjandi burturbeining av lívrunnum tilfari, og tøðum frá føroyskum bóndum.

Burtur úr tilfarinum, sum verður viðgjørt/avgassað, verður útvunnin hiti, sum skal latast til Fjarhitafelagið, umframt at veita streym til SEV.

Samstundis er ætlanin, at bøndur skulu fáa latna tilfarið aftur sum avgassað tøð. Hetta gevur bóndum møguleika fyri at taða oftari, og uttan at taðingin hevur við sær keðilig umhvørvisárin, sum annars er galdandi fyri taðing við vanligum tøðum.

Við at byggja nevnda biogassanlegg fáa alarar tann fyrimun, at teir sleppa av við lívrunnið burturkast, samstundis sum bøndur sleppa av við sítt avfall.

Bygging av einum slíkum anleggi er fult í tráð við ætlanina hjá landi og kommunum at útvinna mest møguligt av grønari orku, samstundis sum hetta tiltak vil verða til stóran frama fyri umhvørvið sum heild.

Umsøkjarin ynskir at fáa grundøkið til keyps fyri ein keypspening sum svarar til kostprísin.

Um neyðugt er at broyta byggisamtyktina, fyri at byggja nevnda anlegg á økinum, verður samstundis biðið um, at byggisamtyktin fyri økið verður broytt.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Matr. nr. 139b á Skarðshjalla liggur í umráðispartinum B8 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar sambært kap. 4, §15 eru:

- Loyvt er einans at byggja hús til vinnuvirkir, her undir umsitingar- og tænastuvirki, verksmiðjur, goymslur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.
- Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 4 til 6 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

Umhvørvisflokkur 6: Umfatar virkir, ið hava størri ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi. Kunnu staðsetast í størri ídnaðarøki, har fráleiki til grannar kann haldast. Eisini kann staðsetingin verða í vinnuøkjum, har bert virkir við serligum fráleikatørvi liggja. Virkir í hesum flokkinum eru størri maskin- og betongvirkir, sláturvirkir og asfaltvirkir. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 300 metrar.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Matr. nr. 139b, sum umsøkjarin biður um at fáa til keyps, er innasta økið á Skarðshjalla.
Biðið verður um at fáa 20.000 m² og er tað alt økið sum er eftir innanfyri tað síðstu útstykkingina á Skarðshjalla.

Skal kommunan selja økið til P/f Salmon Protein, so krevur tað loyvi frá Landsstýrinum, tí talan er um eitt øki sum er størri enn 300 m², sum verður selt uttan útboð.

Í staðin fyri at selja, so kann kommunan geva felagnum optión uppá økið í eitt tíðarskeið. Soleiðis tryggjar kommunan sær, at um biogass anleggið ikki verður bygt, so kemur kommunan framhaldandi at ráða yvir økinum, sum kann latast til bygging av nýggjari brennistøð ella annað.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**
Eitt øki skal eisini finnast til at byggja eina nýggja framtíðar brennistøð, møguliga fyri alla Føroyar, sum eisini kann lata hita til Fjarhitafelagið og møguliga streym til SEV.

Um økið á Skarðshjalla verður latið til biogass anlegg, so skal eitt annað øki finnast til nýggja brennistøð, tað kundi verið á Ovara Hjalla.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum:**
Av tí at onki projekt fyriliggur, so ber ikki til at siga um ætlanin krevur frávik/lættar frá ásetingunum.

Umsóknin er helst í tráð við ásetingarnar fyri økið, men tað skal kannast nærri, tá fleiri upplýsingar fyriliggja.

Skal biogass anlegg byggjast á staðnum, so er talan um eitt kap. 5 virki, sum krevur umhvørvisgóðkenning.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 6

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Tórshavnar kommuna eigur lendið sum søkt verður um.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum:**

**Tekniska deild:**
Býarverkfrøðingurin hevur verið við til at lýsa málið.

**Býarskipanardeildin:**
Í sambandi við ídnaðarvirksemið á Skarðshjalla, so er skilagott at staðseta eitt nýtt biogass anlegg innast á økinum, hetta eisini í sambandi við eina møguliga útbygging/flyting av brennistøðini, ið somuleiðis er eyðsædd at verða staðsett tætt við biogass anleggið. Eftir

ætlan verður ídnaðarøkið á Hjalla víðkað omanfyri verandi virksemið, ið leggur upp til fleiri grundøki og møguleikar til vinnu og ídnað.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Tá myndugleikaprojekt fyriliggur, skal málið sendast til:
- Umhvørvisstovuna í sambandi við umhvørvisgóðkenning
- Arbeiðs- og brunaeftirlitið

**Skjøl:**
Skjøl sum eru tøk í sambandi við viðgerðina av málinum:
- Umsókn frá Christian Andreasen, j.nr. 18/00908-2

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til:
at kommunan gevur P/f Salmon Protein optión í 2 ár uppá at keypa umleið 20.000 $m^2$ burtur av matr.nr. 139b, Hoyvík, til staðseting av nýggjum biogass verki.
at optiónin verður treytað av, at áðrenn endaligt keyp ferð fram, skal tilsøgn um byggiloyvi fyriliggja, umframt avtala um veiting av framleiddari orku, m.a. til fjarhitafelagið.
at beina málið í fíggjarnevndina, til at áseta aðrar treytir, m.a. um kostnað og tíðarætlan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og geva P/F Salmon Protein optión í 2 ár uppá at keypa umleið 20.000 $m^2$ burtur av matr. nr. 139b, Hoyvík við omanfyristandandi treytum og til kostnað, ið verður at áseta við støði í kostnaðinum av teirri byggibúning, sum er gjørd á lendinum. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti.** Kommunan søkti Heilsu- og innlendismálaráðið um frávik frá kravinum um alment útboð.

Í svarskrivi frá Heilsu- og Innlendismálaráðnum, eru millum aðrar, hesar viðmerkingar og grundgevingar.

Høvuðsreglan viðvíkjandi sølu av kommunalari fastogn er, at føst ogn hjá kommununi ikki má seljast, uttan so, at ognin hevur verið boðin út alment, sbrt. § 44, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 2000 um kommunustýri, hereftir kommunustýrislógin.

Eitt endamál við kravinum um alment útboð av kommunalari fastogn er at tryggja, at almenningurin hevur kunnleika um at kommunalar fastognir eru til sølu, og at øll hava líka stóran rætt til at bjóða upp á ognina. Við at bjóða ognina út alment tryggjar kommunan seg

harafturat ímóti atfinningum um, at einstaklingar ella einstakt virskemi fær ein ósakligan framíhjárætt til ognina.

Í kunngerð nr. 122 frá 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn, hereftir kunngerð um alment úboð, eru undantøk til høvuðsregluna. Sambært § 2, stk. 2 í kunngerðini kann verða vikið frá kravinum um alment útboð, tá tað eru serlig viðurskifti, ið tala fyri at fastognin kann verða seld uttan alment útboð. Eftir umstøðunum kann søla til ídnaðarendamál verða undantikin útboði, tá kommunan hevur fingið tilboð um keyp av ávísari ogn, sum orsakað av plasering, nýtslumøguleikum ella øðrum viðurskiftum, sum hevur avgerandi týdning fyri viðkomandi tilboðsgevara. Undantakið í § 2, stk 2 er tó einans ætlað at vera nýtt í serligum føri, har tað má metast, at kravið um alment útboð vil forða søluni óneyðugt og at alment útboð ikki hevur við sær tilboð um hægri keypsprís.

Soleiðis sum málið er lýst, metir Heilsu- og innlendismálaráðið ikki, at alment útboð vil forða søluni óneyðugt.

Vísandi til grundgevingarnar omanfyri, er Heilsu- og innlendismálaráðið komið fram til, at vikið verður ikki frá kravinum um alment útboð av kommunalari fastogn.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í Stjórnarskrivstovuni, mæla fíggjarnevndini til, at umrøða málið, herundir, um kommunan skal lýsa umtalaða økið leyst til hægstbjóðandi, og til ein minstaprís, ið verður at áseta við støði í kostnaðinum av teirri byggibúning, sum er gjørd á lendinum.

Í sølulýsingini skal takast tað fyrivarni, at kommunan tilskilar sær ræt ttil at havna øllum boðum.

Víst verður til § 6, í kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn sum ásetur at Bý- ella bygdaráðið kann havna øllum innkomnum tilboðum.
Víst verður eisini til § 6. stk. 2. sum ásetur, at tað í føri, har ogn er boðin út til frammanundan ásettan prís, verður boðin hægri prísur, skulu tey, ið hava boðið ásetta prísin, hava møguleika til at koma við nýggjum boði.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri broyting at lýsa uml. 12.000 fermetrar av nevnda øki til sølu til hægst bjóðandi og áseta minstaprísin til kr. 675,- pr. fermetur og beina malið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og ongari blankari.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini.

# 244/18 Ljósregulering við Eystara Ringvegur/Hvítanesvegur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 120/14 | 14/02605-15 |
| 2 Tekniska nevnd | 26.05.2014 | 144/14 | 14/02605-15 |
| 3 Tekniska nevnd | 14.03.2017 | 23/17 | 14/02605-15 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.03.2017 | 70/17 | 14/02605-15 |
| 5 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 95/17 | 14/02605-15 |
| 6 Tekniska nevnd | 02.10.2018 | 59/18 | 14/02605-15 |
| 7 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 281/18 | 14/02605-15 |
| 8 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 244/18 | 14/02605-15 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**

Ætlanin er at fáa gjørt eina kostnaðarmeting fyri at fáa sett upp ljósregulering á vegamótinum Ringvegur/Hvítanesvegur.

Á fíggjarætlanini fyri 2012 eru avsettar kr. 1,5 mió. til Eystari ringv./Hvítanesvegur – ljósregulering, á konto fyri íløgur, nr. 8175.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á plan- og rakstrardeildin mæla til at játta kr. 200.000,- fíggjað av kto. 8175 fyri íløgur fyri vegir 2012, til at gera ferðslumeting og kostnaðarmeting at leggja fyri nevndina aftur. Mælt verður eisini til at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 14. februar 2012:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Símun Simonsen, Levi Mørk og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.
Ein minniluti, Jan Christiansen, metir at besta ferðslu loysnin er, at gera eina rundkoyring og tekur tí ikki undir við at játta pening til ljósregulering.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Elin Lindenskov, samtykkir at mæla býráðnum til at játta kr. 200.000,- fíggjað av kto. 8175 fyri íløgur fyri vegir 2012, til at gera ferðslumeting og kostnaðarmeting at leggja fyri nevndina aftur.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Bogi Andreasen, vísir til støðuna hjá minnilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðið 23. februar 2012:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Rúni Djurhuus og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Bogi Andreasen, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Umsitingin kunnar um málið.

**Ferðslunevndin 30. mars 2012:** Kunnað varð um málið.

Umsitingin leggur fram fyriliggjandi skitsu uppskot j. nr 2012-0279/6.

**Tekniska nevnd 25. juni 2012:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Nógvir ivaspurnignar hava verið frammi um farast skal undir at gera rundkoyring ella ljósregulering. Ì hesum sambandi verður víst til fylgjandi mál:

1. Mál nr. 2002-1244 Rundkoyring við Hvítanesvegin/Eystara Ringveg viðv. uppskoti um rundkoryring upp á Diametur 37 m.

2. Mál nr. 2008-3700 Nevndarviðgerð: Rundkoyring Hvítanesvegur - Eystari Ringvegur, Diametur 30 m, kostnaður kr. 14.363.529,- sambært skjali nr. 2008-3699/4.

3. Mál nr. 2008-3699 Fíggjarviðurskifti: Rundkoyring Hvítanesvegur - Eystari Ringvegur viðv. tilboði upp á rundkoyring við ymsum diametrum.

4. Mál nr. 2007-3545 Fyrispurningur til Rambøll viðv. fyrimunum og vansum á vegaøkinum við Eystara Ringveg.

Fyri at fáa staðfest kostnaðin í dags prísum á rundkoyringum sambært omanfyri standandi málum, verður neyðugt at fáa kannað einleikaprísirnar fyri fyriliggjandi uppskotum. Tá hetta er gjørt, ber betri til at samanbera kostnaðarstøðið við uppskotið um ljósregulering á vegamótinum.
Til tess at fáa lýst fyrimunir og vansar ítøkiligari hvat sjálvari ferðsluni viðvíkur, við antin at gera rundkoyring ella ljósregulering, ber til at gera hetta við simuleringum av ferðsluviðurskiftunum á vegamótinum, sum ráðgevi hevur gjørt.

Umboð fyri Rambøll kemur at leggja fram simuleringar.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Umsitingin verður biðin um at koma við kostnaðarmeting av rundkoyring við hóskandi diametri og trafikkstýrdari ljosregulering at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur sambært nevndarsamtykt 27.02.2013 saman við ráðgeva gjørt kostnaðarmeting.

**Tekniska nevnd 30. april 2014: Útsett.**

**Tekniska nevnd 26. mai 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjøgnumgingið málið av nýggjum. Tað hava verið fleiri loysnir havdar á lofti bæði við rundkoyringum og ljósregulering. Umsitingin metir, at besta og bíligasta ferðsluloysnin er ein ljósregulering.

Neyðugt er at eftirkanna prosjektuppskotið frá 2012 og at gera høvuðsprosjekt klárt til útbjóðingar. Tá høvuðsprosjektið er gjørt liðugt, verður greitt, í hvønn mun tað verður neyðugt at ogna sær lendi til verkætlanina.

**Víst verður til hesi skjøl**
TK j. nr. 17/00917-3 Rambøll Nyvig – Skitseforslag til overslag

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tikið verður undir við loysnini við ljósreguleringini á vegamótinum Hvítanesvegur-Eystari Ringvegur. Mælt verður eisini til at heita á ráðgevan um at gera høvuðsprosjekt klárt til útbjóðingar, og at játta kr. 400.000,- til endamálið av íløgukontoini fyri vegir, konto 8175, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 14. mars 2017: Ein meiriluti, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Turið Horn samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.**

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum, men at kostnaðarmeting fyri eina rundkoyring eisini fyriliggur, tá málið kemur aftur í nevndina.

**Fíggjarnevndin 22. mars 2017: Ein meiriluti, Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.**

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við málinum og mælir til, at ein kostnaðarmeting fyri eina rundkoyring fæst til vega, áðrenn støða verður tikin í málinum.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurdsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ljóskurvarnar við vegamótið Hvítanesvegurin – Eystari ringvegur, eru enn nakrar avbjóðingar við at fáa ferðsluna at glíða optimalt. Serliga vísir tað seg at vera torført at fáa ferðsluna at glíða á Eystara ringvegi, móti vegnum Yviri við Strond, í meldurtíðini. Bilrøðin kann strekkja seg, frá ljóskurvunum og heilt oman móti tyrlupallinum. Hetta ber í sær, at ferðslan frá Hoyvíksvegnum inn á ringvegin eisini verður tarnað.

Umsitingin hevur umrøtt hvør loysnin kann vera og er komin fram til at gera eina høgrasvingsbreyt. Hendan fer at stytta munandi um bilrøðina her, sí viðfestu mynd (Hvítanesvegur – ringvegur_breiðan.jpg). Samstundis skulu setast upp fleiri høgrapílar í vegamótinum.

Tekniska fyrisitingin hevur fingið eina kostnaðarmeting frá ráðgeva á 1,3 mió. kr. uttan MVG fyri breiðkanina av Eystara ringvegi. Ætlanin er somuleiðis at breiðka Hvítanesvegin frá

vegamótinum og oman til Hoydalsá. Her er mettur kostnaður umleið kr. 500.000, umframt útbygging av ljóskurvunum.

Í sambandi við frílendið niðanfyri, móti Hoydølum, er komið ynski um ein ljóðvolla, sum fer at dýrka verkætlanina nakað.

Samlaður kostnaður er mettur til kr. 1,9 mió. kr.

**Tá hetta arbeiði er gjørt, væntar bert at breiðka Eystara ringveg á teininum frá ljóskurvunum og niðan móti rundkoyringini á Hálsi.**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at verkætlanin verður framd sum skjótast og fíggjað av tøkum peningi og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 02. oktober 2018: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018: Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 1,9 mió. av konto 6875 L00001 og beina málið í býráðið.**

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt.

## 245/18 Umsókn um yvirtøku av vegi matr. nr. 1361r og 13161b, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.05.2018 | 31/18 | 18/00154-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.10.2018 | 303/18 | 18/00154-3 |
| 3 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 245/18 | 18/00154-3 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn til yvirtøku av vegi.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Eigarin av matr. nr. 1361r og 1361b, Sp/f Høgni Mikkelsen hava í umsókn heitt á kommununa um at yvirtaka vegin við tilhoyrandi installatiónum. Sí viðhefta kort 01.
Vegurin sum er partur av eini útstykkingarætlan er nýgjørdur og er uttan feilir og manglar, sí viðheftu myndir.

Eisini er ynski um at kommunan yvirtekur gøtu, sum liggur á matr. nr. 1361b. Sum framgongur á viðhefta korti 02, er talan um ein matrikul sum liggur í trimum lutum. Umsitingin mælir til, at umsøkjarin fyrst setur seg í samband við Umhvørvisstovuna, fyri at fáa gøtuna matrikuleraða til vegin. Tá hettar er gjørt, er gøtan partur av vegnum og sostatt eisini yvirtikin av kommununi.

Tá talan er um nýgerð, eru ongar útreiðslur í sambandi við yvirtøkuna.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ongin viðmerking

**Upplýsingar frá umsitingini**
Sí lýsing av málinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongin viðmerking

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongin viðmerking

**Umhvørvisárin**
Ongin viðmerking

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongin viðmerking

**Skjøl**
Kort 01
Kort 02
Myndir

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri | Fyri ávís | Fyri ávísar | Fyri |
|---|---|---|---|---|

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. oktober 2018 | Blað nr.: 949 |
| | Formansins merki: |

| | Tórshavnar kommunu | økir í kommununi | samfelagsbólkar ella felagsskapir | vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at boðað verður umsøkjarunum frá, at Tórshavnar kommuna er sinnað at yvirtaka vegin á matr. nr. 1361r uttan kostnað fyri kommununa eins og boðað verður frá, at gøtan verður yvirtikin, tá matrikulviðurskiftini eru greið.

**Tekniska nevnd 08. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt.

# 246/18 Hugskot/uppskot um nýtslu av tilfari úr Sandoyartunlinum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 77/18 | 17/03303-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 98/18 | 17/03303-2 |
| 3 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 16.04.2018 | 5/18 | 17/03303-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.04.2018 | 109/18 | 17/03303-2 |
| 5 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 103/18 | 17/03303-2 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2018 | 207/18 | 17/03303-2 |
| 7 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 246/18 | 17/03303-2 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Uppskot er komið inn um hvussu ein partar av tilfarinum úr Sandoyartunlinum kundi verið nýtt til at fylla upp út fyri Kirkjubø.

Tað hevur verið landfast millum hólman og land og nú møguleiki er at fáa grót, er upplagt at tað lendið, havið hevur máa burtur, verður tikið aftur og lagt sum eitt prýði fyri Kirkjubø og tey nógvu ferðafólk sum har koma og har Føroya mætastu fornminnir eru.

Støða er ikki tikin til hvat økið skal brúkast til, men nærliggjandi er at brúk er fyri øki til vaksandi ferðavinnuna bæði til lands og á sjónum vestanfyri. Fleiri bygningar og gøtur eru burturmáaðar og fornfrøðingar vita um steinsettar gongugøtur sum peika beina kós út móti hólmanum.

Ætlanin er at lata hólman verið leysan, tí hólmurin er blivin serstakur við tað at fuglur, terna, æða o.a. fuglur eigur har.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Á landi, har fylt verður ímóti, liggur økið í umráðispartinum H, G, D og H1 í serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað og Kirkjubø.

Økini eru løgd út sum
H, Frílendi
G, Neyst og bátapláss
D, Havnaøki
H1, Friðað øki

Neyðugt er at broyta byggisamtyktina.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Talan er um at fylla upp út til- og eitt sindur runt um hólman. Vestanfyri verður eitt nýtt øki uppá uml. 65.000 m² og eystanfyri uml. 62.000 m²

Tað er ikki upplýst hvussu nógv grót skal brúkast.

Hetta arbeiði krevur, at stórt grót verður lagt uttast sum brimverja.

<u>Borgarafundur var hildin á Velbastað 20.03.2018</u>
Annika Olsen legði fyri við m.a. at siga, at grótið er eitt stórt tilfangi, tað kann nýtast til planering, vegagerð, ítróttarøki, ídnaðarøki og bakkaverjur.

Teitur Samuelsen greiddi frá teirra ætlan at tyrva grótið í tveimum økjum, við sunnaru omankoyring frá Landsvegnum til Velbastað, at brúka til dyrkingarlendi.

Bjørn Paturson greiddi frá teirra ætlan, at fylla landið uppaftur sum náttúran hevur tikið frá Kirkjubø millum Kirkjubøshólman og landið "Kirkjubøfløtan" har fáast kunnu 65.000 + 62.000 fermetrar hvør síni megin hólman.

Søren Yde frá Holscher Nordberg Architects løgdu fram eitt hugskotskatalog, við uppskotum um hvat grótið kann brúkast til.Herundir nýggj bústaðarøki og ymisk grøn øki í náttúruni.

Stein Olvur Petersen greiddi frá teirra ætlan at fylla upp norðanfyri økið á Gomlurætt, soleiðis at teir fáa eitt nýtt vinnuøki uppá íalt 75.000 m² (til samanlíkningar er vinnuøkið í vika uml. 50.000 m²).

Síðani var orðaskifti, har tað m.a. kom fram:
- at tað er ikki rætt at leggja eftir dyrkaðum lendi
- at tað kunnu fáast góð bústaðarøkir á Velbastað, men so skal kommunan gera íløgur í vegir, kloakkir og leiðingar, umframt skúla v.m.
- at tað at verja fornminnini í Kirkjubø og á Velbastað eigur at verða raðfest høgt.
- at verandi vegur á Velbastað er ov smalur og nú ber til at breiðka vegin við tunnilsgrótinum.

Tað tykist at verða breið semja um, at grótið eigur at verða nýtt til nýtt vinnuøki við Gomlurætt, nýggj bústaðarøki og at verja fornminnini.

Marin Katrina Frýdal rundaði av og segði m.a., at vit fara at hava ein borgarafund aftur.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Kommunan hevur 4 mál um grótið úr Sandoyartunlinum, tey eru:
1. Tórshavnar kommuna, j.nr. 17/02930 Útstykkingar, fríøkir o.a.
2. Tunnilsfelagið, j.nr. 17/00760 Umsókn um at tyrva grótið
3. J&K Petersen, j.nr. 18/00817 Umsókn um vinnuøki á Gomlurætt
4. Bjørn Paturson o.fl., j.nr. 17/03303 Kirkjubøfløtan og fornminnir

Tórshavnar kommuna skal taka støðu til tey 4 uppskotini sum eru komin inn.

Tá støða verður tikin til uppskotini, eiga fylgjandi viðurskifti at verða tikin við í metingina:
- Ætlanin eigur so vítt gjørligt at verða til gagns fyri almenningin, vinnuna ella onnur, soleiðis at tilfeingið verður brúkt á skilabesta hátt.
- Ætlanin eigur so vítt gjørligt at taka atlit til náttúruna.
- Ætlanin eigur so vítt gjørligt at taka atlit til umhvørvið og í tí sambandi eigur ein loysn at verða funnin, har grótið verður flutt sum minst.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Umsóknin krevur, at byggisamtyktin verður broytt.

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1-2

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
<u>Byggi- og umhvørvisdeildini:</u>

Skal ætlanin fremjast, so skulu hesi viðurskifti koma upp á pláss:

- Ognarviðurskiftini, økið talan er um, er í dag sjógvur, men inni við land eru 2 eigarar, tað er Sóknarkirkjan og Føroya Jarðargrunnur
- Friðingarmyndugleikarnir skulu geva loyvi.
- Byggisamtyktin skal broytast
- Prosjekt skal gerast, sum vísir hvussu økið verður fylt upp, hvussu ætlanin er at skipa økið, siglingarrennur o.a.

**Tekniska deild:**
Býarverkfrøðingurin hevur verið við til at lýsa málið.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Friðingarmyndugleikarnir skulu viðgera málið
Landsverk skal viðgera málið, í sambandi við at landsvegur liggur har.

**Skjøl**
Skjøl sum eru tøk í sambandi við viðgerðina av málinum:

- Uppskot, j.nr. 17/03303-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**
Fíggjarligu viðurskiftini eru ikki lýst

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at kommunan svarar uppskotstillaranum, at áðrenn støða verður tikin til málið, má verkætlanin lýsast nærri við tekningum og frágreiðingum, herundir eisini fíggjarligu viðurskiftini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Samtykt at senda málið til hoyringar í kirkjubøar- og velbastaðarnevndini og at leggja málið fyri nevndina aftur á eykafundi skjótast til ber.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 16. apríl 2018:** Nevndin mælir frá at brúka grótið til uppfylling í Kirkjubø, men at mæla til at bakkaverjan verður gjørd sum skjótast.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við Kirkjubøar/Velbastaðarnevndini.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Fundur var við Tjóðsavnið 24.09.2018 og var málið um bakkaverjuna umrøtt. Fundur hevur í juni mánað verið millum Tórshavnar kommunu, Landsverk og Tjóðsavnið, har tosað varð um hvat kann gerast fyri at fáa eina nøktandi bakkaverju. Ætlanin er at tryggja vegin niðan fyri múrin, umframt eitt horn í kirkjugarðinum og at gera brimverju undir sjónum longur úti, soleiðis at brimið verður steðgað í at máa undan kirkjuni. Tað varð upplýst á fundinum, at Landsstýrið hevur sett 1 mió. kr. av til arbeiðið, og at hetta er ein verkætlan fyri seg.

Umboðini fyri Tjóðsavnið søgdu harumframt, at hetta projektið, at fylla út ímóti hólmanum, ikki er nakað sum savnið fer at mæla til, tí hetta fer at broyta økið fullkomiliga.

Harumframt verður víst á, at staðbundna nevndin fyri Kirkjubø og Velbastað mælir frá at brúka grótið til uppfylling í Kirkjubø, men at bakkaverjan verður gjørd sum skjótast.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla frá, at farið verður víðari við hesi verkætlanini og mæla til at verkætlanin verður lokað og send í býráðið til kunningar. Mælt verður samstundis til at arbeiðið at skipa nøktandi bakkaverju, heldur fram.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Atkvøtt varð um tilmælið frá borgarstjóranum um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð eimnmælt samtykt.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini.

# 247/18 Tillagan av parkeringsøkinum hjá Havnar Sjónleikarfelag matr. nr. 763, Tórshavn til almenna nýtslu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.03.2018 | 11/18 | 18/00786-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 83/18 | 18/00786-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 87/18 | 18/00786-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 02.10.2018 | 53/18 | 18/00786-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 282/18 | 18/00786-1 |
| 6 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 247/18 | 18/00786-1 |

**Upprunin til málið:**
Í sambandi við at kommunan hevur samtykt at víðka tíðaravmarkaða parkeringsøkið í miðbýnum Havn, og harvið veita fleiri búgvum parkeringsloyvir mál nr. 17/02781, hevur kommunan brúk fyri fleiri skipaðum parkeringsplássum í miðbýnum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í nógv ár hava borgarar og vitjandi brúkt parkeringsøkið matrikul 763, sum Havnar Sjónleikarafelag er eigari av, til almenna nýtslu. Nevndin í Havnar Sjónleikarafelag hevur munnliga avtalu við kommununa, at kommunan kann brúka og skipa parkeringsøkið, um Havnar Sjónleikarafelag fær 2 parkeringspláss til egna nýtslu.

Eftir at skúlastovubingjurnar vóru niðurtiknar í 2015, hevur parkeringsøkið verið ógvuliga óskipað, jarnpláta liggur yvir stórt hol og ein gomul gittarmastur við ongum ljósi, er parkeringskeltis haldari.

Umsitingin heldur, at nú er eitt gott høvi at fáa skipaði viðurskiftir á hesum parkeringsøki við m.a. asfaltering og avmerkjan av básum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Uppskot er gjørt til ein sáttmála um nýtslusamstarv við Havnar Sjónleikarafelag um parkeringsøkið, sí sáttmála undir skjøl.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í dag er parkeringsøkið ikki upplýst, í hesum sambandi hevur gøtuljósdeildin ætlanir um at uppseta tvey gøtuljós.
Ruskspann verður eisini uppsett á økinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongin viðmerking

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongin viðmerking

**Umhvørvisárin**
Ongin viðmerking

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongin viðmerking

**Skjøl**
Kort av parkeringsøkinum við Sjónleikarahúsið 18/00786-2, staðseting av 16 parkeringsbásum, gøtuljósum, vegristum og parkeringsskelti.
Uppskot um avtalu við Havnar Sjónleikarafelag um parkeringsøki 18/00786-3.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Asfaltering og merking verða fíggjað av rakstrinum

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk 169.400 | Dkk |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk 169.400 | | | | | | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk 150.000 | | | | 8112 | Asfalt (rakstur) | | | |
| Dkk 19.400 | | | | 8113 | Ferðsla (rakstur) | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til, at gjørd verður avtala við Havnar Sjónleikarafelag um nýtslusamstarv av parkeringsøkinum við Sjónleikarhúsið, og at klárgeran av arbeiðinum verður fíggjað av rakstrarkonto. 8112 og 8113, umframt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 06. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við tillaging av parkeringsøkinum hjá Havnar Sjónleikarafelag, hevur umsitingin fingið størri avbjóðingar enn undanmett. Undir parkeringsøkinum er umleið 250 $m^2$ gamal kjallari við betongdekki og asfalti omanyvir, sum hongur á nøkrum betong súlum.

Tá starvsfólk hjá teknisku deild fóru at umvæla holið á parkeringsøkinum var skjótt greitt, at tilfarið á 60 ára gamla dekkinum var í ógvuliga vánaligum standi, so størri umvæling má til.
Umsitingin metir, at besta loysnin er at brekka alt dekkið burtur og fylla grót í kjallaran, sum verður mett til 500 $m^3$.
Orsakað av størri umvæling og eini meir íløgu á umleið 450.000 kr. metir umsitingin, at nýtslu samstarvsavtalan við Havnar Sjónleikarafelag skal broytast frá 10 til 30 ár.

Umsitingin hevur samskift við Havnar Sjónleikarafelag um avbjóðingina av tillagingini av parkeringsøkinum og kunnað um hvørja loysn umsitingin er komin til, fyri at tryggja eitt trygt parkeringsøki fyri framtíðina. Haraftrat hevur starvsnevndin hjá Havnar Sjónleikarafelag samtykt, at kommunan kann broyta samstarvsavtaluna frá 10 til 30 ár, somuleiðis ynskir Havnar Sjónleikarafelag at fáa talið á teirra privatu parkeringsbásum broytt frá 2 til 3.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta ein meirkostnað áljóðandi kr. 450.000 av konto 8110 til uppfylling og tryggjan av parkeringsøkinum, og haraftrat at avtalan við Havnar Sjónleikarafelag um nýtslusamstarv av parkeringsøkinum verður broytt frá 10 til 30 ár og at Havnar Sjónleikarafelag fær 3 parkeringsbásar til egna nýtslu, umframt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 02. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt.

# 248/18 Mold- og avgrevsturpláss Frammi í Dal í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.08.2018 | 175/18 | 18/02077-1 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 06.09.2018 | 6/18 | 18/02077-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 02.10.2018 | 55/18 | 18/02077-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.10.2018 | 52/18 | 18/02077-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 286/18 | 18/02077-1 |
| 6 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 248/18 | 18/02077-1 |
| 7 Kollafjarðarnevndin | | | 18/02077-1 |

**Upprunin til málið:**
Tekniska fyrisiting ynskir at málið verður tikið til viðgerðar. Tørvur er á plássi til móttøku av avgrevstratilfari í Kollafirði.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Verandi nýggi festari av Sjóvarhaga fremri partur hevur spurt kommununa, um hon hevur ætlanir at halda áfram við móttøkuni sum var. Hann hevur einki ímóti at tað verður hildið áfram, um so er, at kommunan tekur undir við hesum, og at øll loyvi frá Landsverki og friðingarmyndugleikunum verða fingin til vega. Hetta fyri at bóndin kann leggja ætlanir fyri sítt framtíðar landbúnaðarvirksemi.

Sambært hjálagda korti av økinum sæst, hvat er tyrvt seinastu 22 árini. Víddin á nýggjum øki er uml. 22.000 m$^2$ og kann rúma uml. 100.000 m$^3$ av avgrevstrartilfari, ið kann gerast til góðan sláttubø.

Uppskot til staðseting er sum víst á korti, og er gjørd í samráð við festaran. Um tikið verður undir við staðsetingini, er síðani at fáa til vega loyvi frá Búnaðarstovuni, friðingarmyndugleikunum og landsvegamyndugleikanum.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
- Hagalógin
- Náttúrufriðingarlógin
- Fornfriðingarlógin
- Landsvegalógin

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Matr. nr. 312, Kollafjørður
Eigari: Búnaðargrunnurin/Búnaðarstovan
Festari: Leon Sólheyg, fyrr Rólvur Djurhuus
Økisvídd: ið søkt verður um, uml. 22.000 m$^2$

Móttøku pláss til mold- og avgrevstur hevur verið á staðnum við landsvegin Frammi í Dal í 22 ár, tíðarskeiðið 1990-2012, á lendi hjá Sjóvarhaga fremri partur, matr.nr. 312.

Sáttmáli varð tá avtalaður millum Búnaðarstovuna og festaran øðrumegin og Tórshavnar kommunu hinumegin í 2001.

Í 2011 kravdi Yvirfriðingarnevndin, at plássið varð avriggað og niðurlagt. Síðani hevur verið roynt at finna annað stað. Nú í nøkur ár hevur verið móttøkupláss eystan fyri landsvegin Norðuri í Sundum, á øki hjá privatum eigara, tað plássið er undir avrigging.

Eisini varð gjørt uppskot til móttøkupláss vestan fyri Dalánna á lendinum hjá Búnaðarstovuni/Royndarstøðini, mál nr. 2001-0243. Projekt og skipanarætlan varð gjørd, men tann verkætlanin steðgaði upp í november 2010.

Umhvørvisdeildin hjá kommununi umsitur tyrvingarpláss.

**Onnur viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri málið:**
- Ferðsla til og frá og dálking út á landsveg.
- Eftirlit við plássinum, at plássið skemmar sum minst í landslagnum.
- At fráleiki verður hildin til Dalánna, og at einki óvanda tilfar rennur út i ánna.
- At avriggað verður so hvørt, einaferð um árið verður ein liðugur partur sáddur við grasfræ og latin festinum til nýtslu.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**
At bert mold og avgrevstur úr Tórshavnar kommunu norðanfyri Hórisgøtu nýtir økið.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum:**
Um annað, skal søkjast um serligt loyvi.

**Umhvørvisárin:**
Sjónlig estetisk/fagurfrøðilig ávirkan, sær út sum stór velta, áðrenn gras verður sátt, síðani prýðiligur bøur.

**Umhvørvisflokking:**
Flokkur 3,5. Staðseting burturfrá tættbygdum øki, eingin umhvørvisdálking, bert sjónlig lýtir og maskinóljóð, meðan arbeitt verður og til- og frákoyring av lastbilum við tilfari.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum):**
Málið hevur ikki verið hjá øðrum deildum, og tískil ongar viðmerkingar enn frá øðrum deildum.

**Skjøl:**
Kort av øki, journal nr. 18/02077-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | x |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**

Virkandi tekniski stjórin, virkandi leiðarin á umhvørvisdeildini og virkandi býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við, framhaldandi at hava mold- og avgrevstrarmóttøku í Kollafirði, at staðsetingin verður norðanfyri verandi moldpláss og at beina málið í staðbundnu nevndina til kunningar og annars í teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kollafjarðarnevndin 06. september 2018:** Staðbundna nevndin tekur undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitinign hevur arbeitt víðari við málinum og er samd um at søkja um neyðug loyvi og gera eina verkætlan. Staðfest er, at málið eisini hoyrir heima í náttúru- og umhvørvisnevndini.

**Tekniska nevnd 02. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Gunvør Balle luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Samtyk at taka undir byggi- og býarskipanarnevndini, teknisku nevnd og náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykkt.

# 249/18 Skipan av Gundadali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2018 | 205/18 | 18/03453-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 08.10.2018 | 314/18 | 18/03453-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 284/18 | 18/03453-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 249/18 | 18/03453-1 |

**Upprunin til málið:**
Tørvur er á at skipa ítróttaøki í Gundadali, bæði í mun til alt virksemi í økinum, grønu geirarnar og at skipa umstøðurnar við atliti at einari dagføring og heildarætlan fyri øki. Økið talan er um sæst á kortskjalið j.nr. 18/03453-3.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Nógv virksemi er í gongd í Gundadali, og eigur heildarætlan at verða gjørd fyri økið.
Í sambandi við at bygging av Tórsvølli byrjaði, gjørdi spanska fyritøkan RFA Fenwick Iribarren Architects eina lýsing "Masterplan" fyri alt økið, og eigur hendan heildarætlanin at verða tikin við, tá farið verður undir at skipa økið av nýggjum. Sí skjal j.nr. 18/03453-2.

Í økinum halda flestu ítróttagreinar til, og skal heildarætlanin rúma øllum virksemi á økinum, umframt møguligum nýggjum virksemi.

Ætlanin um langhyl í Gundadali varð boðin út í kapping í 2016.
Vinnarauppskotið átti Selmar Nielsen arkitektur. Uppskotið vísir hvussu langhylur kann samanbyggjast við verandi svimjihøll, og gevur hugskot til hvussu uttanduraøkið millum svimjihøllina og Fimi kann skipast. Sí j.nr. 16/01381-57,

Samráðingar eru í gongd við ÍSF um niðurtøku av verandi húsið, og samstundi er uppskot um nýtt ÍSF hús gjørt, staðsett við vestara skýlið á ovara vølli. Sí j.nr. 16/01715-33.

Framhald av heildarætlanini fyri Tórsvøll, vestara skýlið er í gongd. Í tí sambandi verða áskoðaraplássini dagførd og koma undir tak, og verða eisini bøttar umstøður fyri m.a. leikarar, dómarar og tíðindafólk sum liður í, at Tórsvøllur skal røkka ásetingini sum "Category 4" leikvøllur. Somuleiðis skal torgið frammanfyri Tórsvøll gerast. Verkætlanin sæst í j.nr. 16/00962-5.

Økið, har spæliplássið í Miðstovninum var, er fyribils tikið uppí byggiøkið fyri Tórsvøll, og hevur umsitingin arbeitt við at finna onnur øki til spælipláss í Gundadali. Málið er fyribils steðgað upp, soleiðis at staðsetingin verður gjørd sum partur av heildarætlanini fyri Gundadal. Sí kortskjal j.nr. 18/01964-2, har tvær møguligar staðsetingar síggjast.

Áður hava ynski verið um at byggja Gundadalshøllina út, so ein vøllur verður afturat. Økið er tøkt til útbyggingina norðan fyri verandi høll, men kemur sera tætt upp at fyrisitingarbygningninum á Tórsvølli og tilbúgvingarveg inn á sjálvan Tórsvøll. Sí j.nr. 15/04217-2. Kommunan hevur verið í samráðingum við feløgini, sum eiga Gundadalshøllina, um at yvirtaka høllina, men enn er eingin endalig semja funnin. Støðulýsing, ið er gjørd av Gundadalshøllini, vísir, at bygningurin og skipanir eru í vánaligum standi, og at stórar umvælingar/útskiftingar verða neyðugar.

Frítíðarskúlin í badmintonhøllini ger vart við plásstørv, og biður um at fáa modulbygging setta á parkeringsplássið, ella at leiga aðrastaðni í økinum. Hetta er lýst í j.nr. 18/00482.

Tennis er ein ítrótt í menning. Tennissamband Føroya er nýtt sersamband, sett á stovn í samráð við ÍSF. Havnar Tennis Felag hevur sett nýggjan høvuðsvenjara, sum skal taka sær av at gera fyrireikingar til Oyggjaleikir 2019, og ynskir Tennisfelagið at fáa endurnýggjað og betra um karmarnar fyri virksemi felagsins, sí j.nr. 18/01726-6.

Ynski er komið frá HB og B36, um at fáa ein minni bóltvøll/samskipaðan vøll millum felagshúsini. Víst verður til j.nr. 15/01225. Eisini er ynski komið frá fótbóltsfeløgunum um betri avskerming kring vallarøkið, soleiðis at tað ikki er neyðugt við so nógvum kontrollørum, tá dystir eru í fremstu deildini.

Bridgehúsið er í vánaligum standi, og verður tikið niður í sambandi við útbygging av Tórsvølli. Ynskiligt er at finna nýggja staðseting til talv- og bridgehúsið. Um tað ikki verður staðsett í Gundadalsøkinum, so skal onnur staðseting finnast til virksemið. Víst verður til j.nr. 16/01316.

Giza Hoyvík-húsið (Framhúsið) er í vánaligum standi. Samráðingar eru við felagið um niðurtøku av húsinum og at finna eina nýggja loysn til felagið við Hoyvíksvøll. Víst verður til mál nr. 18/00009 Fótbóltsfelagið Giza Hoyvík: Felagshús við Hoyvíksvøll

Somuleiðis er møguligt at byggja eitthvørt omaná verandi Fimi bygning. Upplagt er, at lata útbyggingina verða tøka til fimleikavirksemið kann vaksast, tá tørvur verður á tí.

Umframt skipan og staðseting av umstøðum fyri ymiska ítróttavirksemi, skulu fríøkini millum ymisku bygningarnar og vøllirnar eisini planleggjast.
Eisini skal parkering fyri alt virksemið á økinum lýsast og skipast.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í D2 øki, sum í almennu byggisamtyktini er avsett til ítróttaøki.

Ásetingar fyri D2:

> *Umráðispartarturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum*
>
> *Byggistigið má innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki í D2 og D3 ikki fara upp um 0,25 og nýtslustigið ikki fara upp um 0,5.*
>
> *Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Frítíðarskúlin hevur ynski um bygging á økinum vegna plásstørv

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Eru lýst í tekstinum omanfyri.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

| **Býráðsfundur**<br>25. oktober 2018 | Blað nr.: 962 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Kortskjal yvir Gundadal j.nr. 18/03453-2
Y01 Masterplan_Final j.nr. 18/03453-3
Langhylur í Gundadali - Uppskot nr 85650 A3 hefti j.nr. 16/01381-57
ÍSF hús uppskot 4 j.nr. 16/01715-33
Tórsvøllur stadium West Stand – tekningar j.nr. 16/00962-5
Spæliøki stadion j.nr. 18/01964-2 (Nýtt spælipláss í Gundadali)
Re_uppskot_modell j.nr. 15/04217-2 (Fleyr, Neistin og Kyndil: Áheitan um samráðingar við feløgini um útbygging av Gundadalshøllini)
Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini – plásstørvur j.nr. 18/00482
Framløga – HTF_2 j.nr. 18/01726-6 (Umstøðurnar kring tennisøkið í Gundadali)
Umsókn vegna Havnar Bóltfelag HB og Bóltfelagið B36 j.nr. 15/01225
Vegna nevndina í Bridgehúsinum: umbøn um fund viðvíkjandi í Gundadali j.nr. 16/01316
Fótbóltsfelagið Giza Hoyvík: Felagshús við Hoyvíksvøll, j.nr. 18/00009

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | x | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | x | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og býararkitekturin mæla til, at játta kr. 100.000 av L57014 Fótbóltsvøllur í Hoyvík, til at gera avtalu við uttanhýsis ráðgeva at gera heildarætlan fyri ítróttarøkið Gundadalur, og beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 08. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og mentamálanevndini við teirri broyting, at upphæddin á kr. 100.000 verður játtað av konto 6210 og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt.

# 250/18 Skipan av Stórutjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2018 | 206/18 | 18/03468-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 285/18 | 18/03468-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 250/18 | 18/03468-1 |
| 4 Býráðsfundur | | | 18/03468-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna er í menning, og stóri fólkavøksturin merkist serliga í høvuðsstaðarøkinum. Tørvur er á at víðka um býin, og í hesum sambandi verður farið undir arbeiðið at skipa Stórutjørn, matr. nr. 135ed og 1æf, Hoyvík – økið norðanfyri Klingruna og vestanfyri býlingin Inni á Gøtu, sum er uml. 525 ha til støddar, sí skjal *Stóratjørn*.

Geografiskt liggur økið væl fyri, millum bústaðarøkið í Hoyvík, vinnuøkið á Hjalla og nýggja innkomuvegin, sum verður gjørdur í sambandi við Eysturoyartunnilin.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í kommunuætlanini hjá Tórshavnar kommunu er Stóratjørn eitt av teimum økjunum, ið mett veður at hóska seg væl til býarvøkstur. Í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu liggur økið í A3 øki, sum er ætlað blandaðari bústaða- og miðstaðabygging, D2 øki, ætlað ítrótti og øðrum, sum kann virka saman við ítróttinum og D1 øki, sum er økið nýggi kirkjugarðurin í Hoyvík liggur í.

Sum ein liður í at útvega nýtt byggilendi í kommununi, tað verði seg til bústaðir, vinnu, ítrótt, mentan o.a., er ætlanin í fyrsta umfari at bjóða arbeiðið at skipa økið við Stórutjørn út til uttanhýsis ráðgeva.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A3 øki eru m.a.:

- *Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*
- *Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.*
- *Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).*

Ásetingar fyri D1 øki:

- *Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.*
- *Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.*

Ásetingar fyri D2 øki eru m.a.:

- *Umráðisparturin verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.*
- *Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í 2007 varð ætlan um at skipa eina serstaka byggisamtykt fyri Stórutjørn. Økið varð lagt av til vinnuøki, bústaðarbygging, ítróttar- og frítíðarvirksemi og almenn fríøki, sí kortskjal *Serstøk byggisamtykt – kort.*

Bygging og skipan eftir serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn varð tó aldrin til veruleika og ongar ætlanir eru at skipa økið eftir serstøku byggisamtyktini, sum eftir hondini er vorðin ótíðarhóskandi. Tí verður arbeitt við uppskoti um at avtaka serstøku byggisamtyktina fyri Stórutjørn, so arbeitt kann verða við víðari menning og býarvøkstri í økinum.

Í 2015 varð samtykt at geva SEV rættin til optión at keypa eitt uml. 20.000-30.000 $m^2$ stórt byggilendi við Stórutjørn, partur av matr. nr. 135ed, Hoyvík. Hendan optiónin var galdandi í 1 ár, og av tí at Tórshavnar kommuna ikki hevur hoyrt meira frá umsøkjaranum, er avtalan ikki galdandi meir.

Magn stendur á bíðilista hjá kommununi um so er, at kommunan ger eina útstykking til vinnustykkir. Men Magn hevur einans ynski um eitt grundstykki, sum skal liggja við innkomuvegin, og hevur man í síni tíð tikið atlit til hetta ynski í Stórutjørn verkætlanini, har man vildi avseta eitt øki til eina bensinstøð í Hoyvíkshaganum. Har fyriliggur tó ikki ein føst avtala, so um kommunan ikki avsetur eitt øki til bensinstøð í Hoyvíkshaganum, so er einki grundstykki tøkt at tilluta Magn. Somuleiðis er tað ein avbjóðing, at ein einstakur keypari verður valdur at keypa eitt grundstykki við bestu plasering út til møguligan innkomuveg.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Serstøk byggisamtkyt Stóratjørn – broyting av byggisamtykt,* journal nr. 2006-1204.
*Selmar Nielsen: Umsókn vegna SEV um rættin til optión at keypa byggilendi við Stórutjørn partur av matr. nr. 135ed, Hoyvík,* journal nr. 15/02686.
*Avtøka av serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn,* journal nr. 17/03802.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongin

**Umhvørvisárin**
Í sambandi við at serstøk byggisamtykt varð gjørd fyri Stórutjørn í 2008, gjørdi Føroya Náttúrugripasavn, eftir áheitan frá Tórshavnar kommunu, árinskanning av bygging í økinum, sí skjal *árinskanning 1-34.pdf*.

Árinskanningin vísti m.a. at:
- 47 plantusløg vóru skrásett í økinum, ongar av hesum plantum vóru sjáldsamar.
- 13 fuglasløg eiga í økinum. Fýra teirra eru á føroyska reyðlistanum og fevnd av Bonn-sáttmálanum (grágás, spógvi, lógv og vípa).
- Talið av sordýrum er skiftandi úr einum stað í annað. Funnu klukkurnar eru millum vanligu klukkurnar í Føroyum.

Í niðurstøðuni av árinskanningini verður mælt til, at lyngurin í økinum verður vardur bæði í sambandi við grøn øki á byggiøkinum og á økinum uttanum. Somuleiðis verður mælt til at geva fuglinum frið til at byggja á økjunum nærindis (t.d. við at virksemi sum spreinging, ið órógvar fuglin, ikki verður framt, tá ið fuglurin reiðrast).

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Stóratjørn,* journal nr. 18/03468-2.
*Stóratjørn – byggisamtykt,* journal nr. 18/03468-2.
*Innkomuvegur,* journal nr. 18/03468-2.
*SEV optión,* journal nr. 18/03468-2.
*Árinskanning 1-34.pdf.* journal nr. 18/03468-4.
*Serstøk byggisamtykt – kort,* journal 18/03468-5.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta kr. 200.000 av konto L62032 Gøta kring Havnina og fiskastykki, til at gera avtalu við uttanhýsis ráðgeva um at skipa økið við Stórutjørn og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 200.000 av konto L62032 á konto 7315 kommunuætlanin, og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

# 251/18 Langfreistað skuld

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 267/18 | 18/03385-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 224/18 | 18/03385-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 251/18 | 18/03385-1 |

**Málslýsing:**

Tilráðingin er, at kommunan hevur eitt minsta gjaldførið á 80 mió. kr.
Gjaldførið í kommununi er mett at vera nøktandi soleiðis at partur av langfreiðstaðu skuldini kann vera niðurgoldin. Mælt verður til, at fastrentu lánini verða afturgoldin í árinum. Sí skjal nr. 18/03385-2

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, Fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at afturgjalda fastrentulánini.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt.

# 252/18 Eykajáttan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 266/18 | 18/03373-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 225/18 | 18/03373-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 252/18 | 18/03373-1 |

**Málslýsing:**
Eykajáttan krevst í sambandi við hækking av samtyktu fíggjarætlanini, við hækking av bæði inntøkum og útreiðslum.Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað. Eyka játtanir skulu vera samtyktar við aðru viðgerð innan 31. desember í fíggjarárinum.
Inntøkurnar hava verið hægri enn mett og gevur hettar møguleika fyri at hækka fíggjarætlanina í árinum. Framskrivaður kommunuskattur og skattur av eftirlønargjøldum eru 12,9 mió. kr. hægri enn mett. Fleiri rakstrarstøð eru við manglandi fígging og kann tøkið peningurin nýtast til fígging av hesum.

*Cosmic talgild sjúklingajournalskipan til eldraøkið:*
Víst verður til mál 17/03801 Cosmic talgild sjúklingajournalskipan til eldraøkið. Samtykt var á býráðsfundi 24. apríl at geva Kommunufelagnum tilsøgn um, at Tórshavnar kommuna tekur lut í ætlanini við Cosmic. Peningur 1,5 mió. kr. er ikki settur av til endamálið.

*Umsiting og røkt av bygninguum:*
Tørvur er á at hækkað játtanina til umsiting og røkt av bygningum við 1,4 mió. kr. at nýta soleiðis:

| | |
|---|---|
| Skúlin á Løgmannabreyt ljós í kantinu skiftast til LED | 100.000 kr. |
| Lágagarður útskiftan av 12 stk. cirkulatiónspumpum | 180.000 kr. |
| Eysturskúlin útskiftan av cirkulatiónspumpu | 50.000 kr. |
| Eysturskúlin útskifta ljósarmaturir í A bygningi | 450.000 kr. |
| Eysturskúlin útskifta ljósarmaturir í B bygningi | 200.000 kr. |
| Realskúlin meirveitingar | 420.000 kr. |

*Rakstrargøgn:*
Játtanin er til at keypa størri amboð, maskinur, bilar o.a. hjá kommununi. Á hvørjum ári verður gjørdur ein raðfestingarlisti yvir, hvørji amboð og maskinur neyðugt er at skifta út, og somuleiðis hvørjar nýútveganir eru neyðugar.
Mett er, at neyðugt er at hækkað játtanina til rakstrargøgn við 7,1 mió.kr. . Bráneyðugt er at fá ein nýggjan rottangabil. Eisini verður víst til mál nr. 16/01084 keyp av nýggjum stigabili í sambandi við Glasir.

*Kavarudding:*
Játtanin er til kavarudding. Útreiðslurnar kunnu vera sera skiftandi frá einum ári til annað,
alt eftir hvussu vetrarnir roynast. Staðfestast kann, at kontan væntandi fer at hava eina meirnýtslu á 2 mió. kr. í 2018.

*Renovatión:*
Kommunala Brennistøðin hevur til endamáls at røkja kommununnar uppgávur og skyldur í sambandi við burturkast. Økið er í stóran mun reguleráð í lógum og kunngerðum.
Tørvur er á at endurnýggja stýrisskipan á ovni á kommunalu Brennustøðini. Mettur kostnaður er 500 t.kr. Eisini er neyðugt at seta 100 t.kr. av í sambandi við slit á rottangaútgerð.

*Sløkkiliðið:*
Brandstøðin sløkkir eld, hevur kavarar tøkar til druknivanlukkur og tekur sær av umhvørvisóhappum, ferðsluvanlukkum og bjarging í sambandi við storm og vatnskaðar. Neyðugt er at skifta lógarkravda útgerð sum er útgingin. Mettur kostnaður er 300 t.kr.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til, at tøki peningurin verður nýttur til at fíggja niðanfyri standandi soleiðis:

| | |
|---|---:|
| Cosmic | 1.500 |
| Umsiting og røkt av bygningum | 1.400 |
| Rakstrargøgn | 7.100 |
| Kavarudding | 2.000 |
| Renovatión | 600 |
| Sløkkiliðið | 300 |
| | **12.900** |

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið at viðgera sum eykajáttan tvær ferðir.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 253/18 Fíggjarætlan 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 157/18 | 18/01927-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 205/18 | 18/01927-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 191/18 | 18/01927-1 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 13.09.2018 | 34/18 | 18/01927-1 |
| 5 Vinnunevndin | 13.08.2018 | 31/18 | 18/01927-1 |
| 6 Eldranevndin | 10.09.2018 | 10/18 | 18/01927-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 265/18 | 18/01927-1 |
| 8 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 226/18 | 18/01927-1 |
| 9 Vinnunevndin | 01.10.2018 | 40/18 | 18/01927-1 |
| 10 Eldranevndin | 01.10.2018 | 12/18 | 18/01927-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 02.10.2018 | 51/18 | 18/01927-1 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2018 | 193/18 | 18/01927-1 |
| 13 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.10.2018 | 50/18 | 18/01927-1 |
| 14 Trivnaðarnevndin | 01.10.2018 | 38/18 | 18/01927-1 |
| 15 Mentamálanevndin | 03.10.2018 | 285/18 | 18/01927-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 24.10.2018 | 304/18 | 18/01927-1 |
| 17 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 253/18 | 18/01927-1 |
| 18 Trivnaðarnevndin | | | 18/01927-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §39 stk. 1-2 í kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober. Býráðið skal viðgera uppskotið til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin, sum er yvirskipaði fíggjarpolitiski karmurin fyri komandi roknskaparár, skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Stjórnin leggur tekniska framskriving av fíggjarætlanini og uppskot til fíggjarætlanarkarmar fyri fíggjarnevndina at viðgera.

**Ískoyti:**
Búskaparvøksturin hevur hevur haft eina jaliga ávirkan á inntøkurnar. Fólk vilja búgva í Tórshavnar kommunu, og hevur kommunan seinastu árini haft eina tilflyting. Samstundis er tó eitt trýst á útreiðslusíðuni. Fleiri børn eru í kommununi, og neyðugt er at taka hædd fyri økta barnatalinum. Býðurin vaksur og ávirkar hettar somuleiðis fíggjartørvin á tekniskaøkinum. Størsta útreiðsluøki hjá kommununi Almanna- og heilsumál og eru og hevur kommunan somu demografisku avbjóðingar sum aðra staðir. Tíðirnar eru enn góðar, men vit eiga støðugt at ansa eftir, at rakstrarútreiðslurnar halda seg á einum varligum stigi.

Yvirskipað er málið  í uppskotinum ein vøkstur í rakstrarútreiðslum uppá í mesta lagi 2% fyri alla kommununa. Í sambandi við rakstrarútreiðslurnar eigur kommunan, at hava støðugt fokus á um skattakrónurnar verða nýttar so skynsamt sum møguligt. Sum ein liður í hesum skulu útveiting og útboð av vørum og tænastum, har kommunan og borgarin kunnu fáa fyrimun, eftirkannast. Eisini verður mælt til at brúkaragjøld í kommununi vera endurskoðaði.

Lønarsamráðingar hava verið síðani oktober 2018. Hædd er tikið fyri hesum í karmunum fyri 2019 har 2,5% er løgd inn fyri lønarvøkstur, umframt ein regulering á 1% í lønum fyri 2018.

Mælt verður til at halda samlaðu íløgurnar innanfyri skattafíggjaða íløgukarmin, og at ein langtíðaríløguætlan verður gjørd fyri Tórshavnar Kommunu, sum lagar íløgur og rakstur til sveiggj í búskapinum. Hettar eisini við atliti til, at samlað leggja stóru íløgurnar týðandi trýst á búskapin og kommunan fær munandi minni fyri skattakrónurnar.

**Tilmæli:**
Stjórnin og fíggjarleiðarin mæla fíggjarnevndini til, at taka undir við uppskotinum til fíggjarætlanarkarmar á greinastøði 2019. Stjórarnir skulu saman við umsitingini, gera fíggjarætlan og nýggjar metingar fyri 2019, sambært uppskotinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Sambært tíðarætlan fyri Fíggjarætlan 2019 skal stjórnin leggja uppskot til fíggjarætlan á greinastøði fyri fíggjarnevnd.

Tilfar kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Umsitingin greiðir frá status í mun til fíggjarætlanina 2018 og møguligum tørvi á broytingum ella raðfestingum til fíggjarætlanina 2019 á greinum 3, 4 og 5, sí annars samtykt um fíggjarkarm fyr 2019. Sí eisini hjálagt skjal.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða fíggjarætlanina við støði í omanfyri nevnda.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Umrøtt.

**Vinnunevndin 13. august 2018:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Til umrøðu.

**Eldranevndin 10. september 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur til fundin.

**Trivnaðarnevndin 13. september 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur verið við uppskotinum til fíggjarætlan 2019 at leggja fyri fíggjarnevndina. Fortreytirnar fyri uppskotinum eru, at skattaprosentið verður verandi á sama støði, barnafrádrátturin verður framhaldandi 8.000 kr. og hædd er tikið fyri virksemisbroytingum. Í talvuni niðanfyri eru høvuðstølini býtt á kommunugreinar.

| | Býráðsfundur<br>25. oktober 2018 | Blað nr.: 971<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| 1.000 kr. | | Roknskapur 2017 | Ætlan 2018 | Ætlan 2019 | Broyting 2018/2019 pct. | kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 760.890 | 758.000 | 800.740 | 5,6% | *42.740* |
| 20601 | Felagsskattur | 49.662 | 30.000 | 30.000 | 0,0% | *0* |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 2.180 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 119.692 | 123.151 | 131.718 | 7,0% | *8.567* |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 37.224 | 38.167 | 34.979 | -8,4% | *-3.188* |
| 20803 | Tíðaravmarkað flyting til eldraøkið | | | | | |
| | **Inntøkur íalt** | **969.648** | **951.318** | **999.437** | **5,1%** | ***48.119*** |
| | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 82.797 | 82.151 | 91.798 | 11,7% | *9.647* |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 221.876 | 236.172 | 242.232 | 2,6% | *6.060* |
| §3 | Børn og ung | 159.434 | 168.185 | 179.729 | 6,9% | *11.544* |
| §4 | Undirvísing | 40.163 | 41.082 | 42.210 | 2,7% | *1.128* |
| §5 | Mentan og frítíð | 51.177 | 52.291 | 55.969 | 7,0% | *3.678* |
| §6 | Teknisk mál | 117.093 | 130.250 | 136.567 | 4,9% | *6.317* |
| §7 | Kommunal virkir TK | 64.971 | 64.070 | 68.114 | 6,3% | *4.044* |
| §7 | Kommunal virkir TH | -44.831 | -32.235 | -38.210 | 18,5% | *-5.975* |
| | **Rakstur íalt** | **692.680** | **741.966** | **778.409** | **4,9%** | ***36.443*** |
| | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 18.046 | 18.000 | 18.000 | 0,0% | *0* |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 5.635 | 2.456 | 2.500 | 1,8% | *44* |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **23.681** | **20.456** | **20.500** | **0,2%** | ***44*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **253.286** | **188.896** | **200.528** | **6,2%** | ***11.632*** |
| | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 3.468 | 3.000 | 700 | -76,7% | *-2.300* |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | | 17.060 | 0,0% | *17.060* |
| 20401 | Rentuinntøkur | 90 | 100 | 0 | -100,0% | *-100* |
| | **Rentur íalt** | **3.378** | **2.900** | **17.760** | **512,4%** | ***14.860*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **249.908** | **185.996** | **182.768** | **-1,7%** | **-3.228** |
| | | | | | | |
| | **Avdráttir** | **18.193** | **18.900** | **1.234** | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **231.715** | **167.096** | **181.534** | **8,6%** | **14.438** |
| | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **186.884** | **134.861** | **160.384** | **18,9%** | **25.523** |

* Avlop uttan Tórshavnar Havn

Samlaðu inntøkurnar eru mettar at vera 999 mió. kr. í mun til 951 mió. kr. í 2018. Hettar svarar til ein vøkstur á 5,1%.

Í uppskotinum er kommunuskatturin framroknaður við støði í inntøkunum fyrstu átta mánaðirnar í árinum. Harumframt er roknað við einum vøkstri upp á 3%. Eisini er partvís

tikin hædd fyri reguleringini í kommunuskattinum fyri 2018. Inntøkur frá kommunuskattinum hækka sostatt 5,6% ella 43 mió. kr. í mun til fíggjaræltanina fyri 2018.

Inntøkur í sambandi við skatti av eftirlønargjøldum og DIS, FAS og frádráttum eru ásettar sambært upplýsingum frá Fíggjarmálaráðnum.

Tórshavnar kommuna er ein kommuna í stórum vøkstri og merkir hettar økt virksemi og tænastur. Samlaðu útreiðslurnar økjast úr 742 mió. kr. til 778 mió. kr. tvs. við 4,9% ella við 36 mió. kr. í mun til upprunaligu fíggjaræltlanina fyri 2018. Hædd er tikin fyri lønarhækkan, sum stendur fyri einum munandi parti av vøkstrinum.

Lønarútreiðslurnar økjast 6,6% ella 36,6 mió. kr. Herav er lønarhækkanin 16 mió. kr. Raksturin annars økist 3,1 % ella 11,8 mió. kr. og inntøkur annars økjast 6,5% ella 11,9 mió.kr.

*§1 kommunual fyrisiting* økist við 11,7% ella 9,6 mió. kr. Ein partur av økingini kemst av, at Heilsu- og umsorganarfyrisitingin er flutt frá §2 til §1, talan er um kr. 3,9 mió. kr. Uttan hesa flyting var økingin  7,0%. Økingin annars stendst í høvuðsheitum av, at peningur er settur av til Løgtings- og fólkatingsval í 2019, umframt øking í virkseminum á teknisku fyrisiting.

*§2 Almanna- og heilsumál* økist við 2,6% ella 6,0 mió. kr. Vøksturin kemst millum annað av húsaleiguútreiðslum til læknaviðtaluhøli, yvirtøku av rakstrarútreiðslum til smábarnavirksemi hjá Gigni og øktum útreiðslum til ávísar serfrøðingakanningar og fyriskipanir innan barnavernd.

Játtanin til *§3 børn og ung* fylgir í høvuðsheitum barnatalinum, sum væntandi verður munandi hægri í 2019. Sum nýggj raðfesting eru 2. mió. kr. settar av til dygdarmenning á dagstovnaøkinum. Sambært uppskotinum økjast útreiðslurnar til børn og ung 6,9% ella við 11,4 mió. kr.

Játtanin til *§4 Undirvísing* hækkar við 2,7% ella 1,1 mió. kr. Játtanin fylgir mettað næmingatalinum. Økingin annars er til betri internet á skúlunum.

Virksemið á *§5 Mentan og frítíð* er økt. Útreiðslurnar økjast við 7,0% ella 3,7 mió. kr. Hædd er tikið fyri, at Musikkskúlin flytir í størri høli, rakstur av Müllers Pakkhúsi og Finsen, og at nýggj avtala verður gjørd við Fjølrit um upphavsrættindi.

*§6 Teknisk mál* økist við 4,9% ella 6,3 mió. kr. Høvuðsorsøkin til vøksturin eru fleiri fermetrar hjá húsaumsigingini at viðlíkahalda. Tórshavnar kommuna stendur í vøkstri og verða fleiri nýggj økir at umsita. Fleiri nýggir og yvirtiknar vegir eru at viðlíkahalda.

Játtanin til *§7 Kommunal virkir* lækkar í mun til árið frammanundan, við -6,1% ella 1,9 mió. kr. Orsøkin til lækkingina er at játtanin til Tórshavnar Havn lækkar við 6 mió. kr. Játtanin til talgilding til borgaran hækkar, játtanin er til menning av talgildum loysnum til borgaran, hemasíðu og talgilda sjálvagreiðslu. Eisini hækkar játtanin til bussleiðina vegna prístalsjavnan av verandi sáttmála.

Sambært fyriliggjandi uppskoti við nevndu fortreytum og virksemisbroytingum verður úrslit áðrenn rentur 200,5 mió. kr. Úrslit áðrenn íløgur og avdráttir 182,8 mió. kr. Avlop til skattafíggjaðar íløgur verður 160,4 mió. kr.

**Tilmæli**
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober. Býráðið skal viðgera uppskotið til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember. Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælnum og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Framlagt.

**Ískoyti:**
**Røkt og viðlíkahald av bygningum**
Á fíggjarætlanini er seinastu árini sett ov lítið av peningi av til røkt og viðlíkahald av verandi bygningum og tí er eftirsleipið stórt, soleiðis at nógvir bygningar hava tørv á stórum umvælingum.

Fyri at kunna røkja bygningarnar á ein skynsaman hátt, eigur játtanin á 6110 at hækka uppá 200 kr./kvm, sum eftir útrokningunum frá V&S bókunum skal til fyri at halda støði á bygninginum á einum nøktandi grundarlagi, verður hetta gjørt yvir 3 ár, skal játtanin hækka soleiðis:

| **Ár** | **kvm** | **kr./kvm** | **Játtan** | **hækkan/ár** |
|---|---|---|---|---|
| 2018 | 144.166 | 170 | 24.508.220 | |
| **2019** | **146.666** | **180** | **26.399.880** | **1.891.660,-** |
| 2020 | 161.666 | 190 | 30.716.540 | 4.316.660,- (Skúlin á fløtum) |
| 2021 | 161.666 | 200 | 32.333.200 | 1.616.600,- |

**ORKA**
Tórshavnar kommuna hevur samtykt ein Orkupolitikk, og er hetta eisini eitt mál í samgonguskjalinum. Fyri at røkka málinum, er neyðugt seta pengar av á fíggjarætlanini til orkuumvælingar. Roknast skal við at seta umleið kr. 4.000.000,- av um árið komandi 10 árini.

**Trivnaðarnevndin 01. oktober 2018:** Ein meirilutri, Bergun Kass, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við fíggjarætlanaruppskotinum. Meirilutin mælir harumframt til at játtan verður sett av til framhaldandi integratiónsarbeiði, og at konta 2460 Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsumál verður hækkað samsvarandi møguligum nýggjum samstarvsverkætlanum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Bjørghild Djurhuus, atkvøða blankt.

**Vinnunevndin 01. oktober 2018:**

**Ein meiriluti :** Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Jákup Dam og Gunnvør Balle mælir til at at fleiri pengar verða settir av til ferðavinnuna.

**Ein minniluti:** Heðin Mortensen atkvøður blankt.

**Eldranevndin 01. oktober 2018:** Fíggjarætlanaruppskotið er umrøtt. Bergun Kass og Turið Horn ynskja meira pening til keyp av plássum fyri at nøkta bráfengistørvin og til vælferðartøkni.

Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus atkvøða blankt.

**Tekniska nevnd 02. oktober 2018:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við fíggjarætlanaruppskotinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Mentamálanevndin 03. oktober 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við fíggjarætlanaruppskotinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. oktober 2018:** Ein meirilutu, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við fíggjarætlanaruppskotinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. oktober 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bergun Kass, samtykti at taka undir við fíggjarætlanaruppskotinum. Meirilutin mælir harumframt til at peningur verður játtaður á fíggjarætlanini til orkuumvælingar.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus, atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, mæla býráðnum til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan 2019. Viðvíkjandi teimum broytingum, ið nevndirnar hava mælt til, verða hesar beindar aftur í nevndirnar við atliti til at finna fígging innanfyri samlaða karmin í uppskotinum til fíggjarætlan.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøða blankt.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Atkvøtt varð um uppskotið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 5 blonkum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus og Halla Samuelsen

# 254/18 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.02.2018 | 60/18 | 18/00018-1 |
| 2 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 45/18 | 18/00018-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 87/18 | 18/00018-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 125/18 | 18/00018-1 |
| 5 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 99/18 | 18/00018-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 158/18 | 18/00018-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 134/18 | 18/00018-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 212/18 | 18/00018-1 |
| 9 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 167/18 | 18/00018-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 239/18 | 18/00018-1 |
| 11 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 197/18 | 18/00018-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 268/18 | 18/00018-1 |
| 13 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 227/18 | 18/00018-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 293/18 | 18/00018-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 24.10.2018 | 305/18 | 18/00018-1 |
| 16 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 254/18 | 18/00018-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Ískoyti:** Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2018:** Framlagt og góðkent

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Roknskapur fyri februar og mars verður lagdir fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. mai 2018**: Framlagt og góðkent.

**Ískoyti**:
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Framlagt og góðkent**.**

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti**:

Roknskapurin fyri juni verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Framlagt og góðkent**.**

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Framlagt og góðkent**.**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juli verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Framlag og góðkent.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Framlagt og góðkent**.**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti**:
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2018:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapirnir fyri august og september verða lagdir fram til góðkenningar.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt.

## 255/18 Tórsvøllur - vestursíðan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 59/16 | 16/00962-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 185/16 | 16/00962-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.06.2016 | 244/16 | 16/00962-1 |
| 4 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 173/16 | 16/00962-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 16.06.2016 | 193/16 | 16/00962-1 |
| 6 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 76/17 | 16/00962-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 22.01.2018 | 34/18 | 16/00962-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 12/18 | 16/00962-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 23.01.2018 | 27/18 | 16/00962-1 |
| 10 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 17/18 | 16/00962-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 28.02.2018 | 79/18 | 16/00962-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 28.02.2018 | 63/18 | 16/00962-1 |
| 13 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 38/18 | 16/00962-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 258/18 | 16/00962-1 |
| 15 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 217/18 | 16/00962-1 |
| 16 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 255/18 | 16/00962-1 |
| 17 Mentamálanevndin | | | 16/00962-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Útsett.

**Tórsvøllur vestursíða**
Tá Tórshavnar kommuna og Fótbóltssamband Føroya í 2010 settu sær fyri at fáa Tórsvøll til góðkent altjóða stadion, var fyrsta stig at fáa til vega eina heildarætlan, tann sonevndi masterplanurin, sum bæði viðgjørdi skipan av øllum ítróttaøkinum í Gundadali og tørvin á

kravdum fasilitetum til sjálvan Tórsvøll sum landsliðsstadion til altjóða kappingar hjá UEFA og FIFA.

Viðurskifti, sum vóru sett á skrá til tess, vóru m.a.:

- At vaksa um sjálvan leikvøllin samsvarandi altjóða krøvum
- At skifta grasvøllin út við altjóða góðkent graslíkið
- At seta upp nýtt ljósannlegg samsvarandi krøvum til sjónvarping av altjóða dystum
- At yvirdekka áskoðaraplássini til tess at reisa verju fyri vindi og regni, og í hesum sambandi at betra um komfort til áskoðararnar
- At avmarka talið av áskoðarum úr 6.440 niður á uml. 5.000
- At reisa nýggjan bygning á suðursíðuni, ið kann brúkast til nógv ymisk endamál bæði ítróttarliga, vinnuliga og umsitingarliga
- At skipa stadion við nýggjum inn- og útgongdum, ið lúka altjóða krøv

Útyggingarstigini hava í høvuðsheitum verið hesi:

- Nýtt ljósannlegg 2011
- Grasvøllur skiftur til graslíki 2012
- Suðurtribunan tikin niður og nýggjur bygningur bygdur 2013 – er m.a. høvuðsinngongd til Tórsvøll, umsitingarhøli hjá FSF, og 900 áskoðarapláss undir taki og nýggjum setrum
- Eystara skýlið bygt 2014-2015 – tak yvir áskoðarapláss, nýggj setur, vesi og búðir. Eystara skýlið er bundið saman við bygninginum og áskoðaraplássini á suðurendanum.

**Vestara skýlið**

Vestara skýlið er framhald av heildarætlanini, har áskoðaraplássini verða dagførd og koma undir tak. Vesturskýlið verður eins og eysturskýlið bygt saman við bygninginum á suðurendanum og skapar sostatt samanhangandi form sum hestaskógvur. Tá vesturskýlið er bygt, er tað samært heildarætlanini bert torgið frammanfyri Tórsvølli, sum er eftir.

Verkætlanin við vesturskýlinum fevnir eisini um útbygging av gamla FSF-húsinum bæði norður- og suðureftir sum liður í, at Tórsvøllur skal røkka ásetingini um “Category 4” leikvøllir, ið er ásetingin fyri leikvøllir til altjóða landsdystir. Í løtuni er Tórsvøllur ein “Category 3” leikvøllur. Til tess at røkka hesum, skulu umklæðingin til spælarar og dómarar betrast, eins og umstøður til dopingkanningar og læknarúm. Umstøður til tíðindafólkini og VIP eru heldur ikki nøktandi.

Hesir nýggju fermetrarnir hava tann vinning umframt, at umklæðingarrúm, vesir og tey almennu økini kunnu eisini brúkast til tiltøk, sum eru í Gundadali, serliga á Niðara vølli, sum harvið fær høliskarmar til taks, ið ikki eru dag.

Á ovastu hædd eru góðir møguleikar fyri fleirnýtsluhølum, eitt nú gisting í sambandi við landsliðsvenjingar ella skúla, skrivstovur og kravdar VIP-fasilitetir í sambandi við landsdystir. Til ber at byggja 200 nýggj áskoðarapláss her, so at samlaði áskoðarakapasiteturin á vestursíðuni verður uml. 1.730.

Í stuttum fevnir útbyggingin um hesi høli:

- Veghædd – høli til vaktarhaldið, 2 umklæðingarrúm til dómarar, dopingrúm, 2 nútíðar umklæðingarrúm til liðini, høli til tíðindafundir, mixed zone (fjølmiðlar/leikarar), sum harumframt er foreldralounge móti niðaravølli
- 1. hædd – vesi, arbeiðsrúm hjá tíðindafólkuj
- 2. hædd – VIP høli, sølubúðir

- 3. hædd – sonevndar skybox til fleirnýtsluendamál, vaktarrúm

Útbyggingin loysir eisini trupulleikan við inngongdum, har áskoðarar í dag mugu inn á vøllin fyri at koma til áskoðaraplássini. Sum heild fer útbyggingin at lætta munandi um fyriskipan av dystum, kappingum og tiltøkum á Tórsvølli. Tey síðstu áskoðaraplássini, gestir og tíðindafólk koma eisini undir tak. Og ikki minst, at Tórsvøllur verður endaliga liðugur og kann verða ein stoltleiki fyri bæði høvuðsstaðin og landið.

Verkætlanaruppskotið er í mai 2016 lagt fyri UEFA at góðkenna.

Ynskið hjá FSF hevur verið, at útbyggingin skuldi verða liðug í september 2018, tá nýggja kappingin Nations League, sum UEFA skipar fyri, fer av bakkastokki. Hesa tíðarætlan ber ikki til at røkka, nú so langt er útliðið, men mett verður, at til ber at skipa bygginina soleiðis, at dystir kunnu fyrskipast kortini.

Hendan kappingin verður samstundis sum vanligu EM og HM-undankappingarnar. Hetta kemur eisini at økja um virksemið á Tórsvølli, har tað í miðal fara at vera 5 A-landsliðskappingardystir um árið. Spælt verður tá alt árið, tvs. eisini um veturin, har tað eisini er møguligt við øðrum smærri millumlandakappingum.

Útbyggingin gevur eisini nýggjar og betri møguleikar fyri øðrum virksemi á Tórsvølli, serstakliga størri tiltøk og stadionkonsertir.

**Samstarv**
Eins og øll tey undanfarnu útbyggingarstigini síðan 2010, er ætlanin at skipa arbeiðið við vesturskýlinum í samstarvi við FSF eisini fíggjarliga.

Gjørt er uppskot til samstarvsavtalu við støði í avtalunum fyri hini útbyggingarstigini.

Sambært uppskotinum til avtalu verður lagt upp, at byggingi verður skipað í partalagi. Fyribilskostnaðarmeting fyri alt útbyggingarstigið er kr. 98 mió. Lagt er upp til, at hvør parturin rindar helvtina av kostnaðinum, tvs. 50/50, og at gjøldini hjá hvørjum parti fella soleiðis:

2016: FSF kr. 5 mió, TK kr. 5 mió.
2017: FSF kr. 24 mió, TK kr. 8,75 mió
2018: FSF kr. 24 mió, TK kr. 8,75 mió
2019: FSF kr. 5 mió, TK kr. 8,75 mió
2020: TK rindar FSF kr. 8,75 mió
2021: TK rindar FSF kr. 9 mió

FSF hevur góðkent henda leist. Til ber ikki at staðfesta endaliga byggiskostnaðin fyrr enn eftir útboð.

Tíðarætlan yvirskipað:
- Juli-desember 2016 – projektering
- Januar 2017 – útboð
- Februar 2017 – uppstartur og partalag
- Februar-desember 2017 – stig 1: fundamentir, stuðlamúrar, lendisarbeiði, betong, vegur og stál
- Januar-august 2018 – stig 2: Stál, stálsperrur og polycarbonate
- August 2018-august 2019 – stig 3: Komplettering, innleggingar og stólar.

Í avtaluuppskotinum verður, sum omanfyri nevnt, lagt upp til bygging av vestursíðuni í partalagssamstarvi. Harumframt, at skipanin við stýrisbólki millum TK og FSF um Tórsvallar-byggingina verður at halda fram, á sama hátt høvuðsráðgevin.

Til tess at fáa fyrireikað, prosjekterað og bjóða arbeiðið út verður mett neyðugt við játtan frá kommununi uppá kr. 5 mió í 2016 og samsvarandi kr. 5 mió frá FSF.

Sambært dagførdu íløguætlanini fyri 2016 eru settar kr. 5 mió av til Tórsvøll.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at samtykkja uppskot til samstarvsavtalu við FSF um at gera yvirdekking yvir tribunir á vestarasíðu á Tórsvølli og út- og umbygging av verandi bygningi har. Mælt verður eisini til at játta kr. 5 mió av íløguætlanini 2027 5775 Ítróttaranlegg til fyrireiking, projekting og útboð.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 16. juni 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Sigrun Mohr og Halla Samulensen, samtykti at taka undir við fyriliggjandi avtalu millum TK og FSF, við teirri treyt, at tær upphæddirnar sum eru nevndar í avtaluni eru endaligar fyri TK, eisini um verkætlanin verður dýrari, men at útreiðslubýtið verður 50/50 um verkætlanin verður bíligari enn mett.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur ikki undir við avtaluni vegna ov stóran iva um veruliga byggikostnaðin fyri hetta byggistigið.
**Ískoyti:**
Sambært fyriliggjandi uppskoti til avtalu millum TK og FSF fella gjøldini hjá hvørjum parti soleiðis í sambandi við verkætlanina:

2016: FSF 5 mió kr, TK 5,0 mió kr.
2017: FSF 26,25 mió kr, TK 5,0 mió kr.
2018: FSF 26,25 mió kr, TK 6,0 mió kr.
2019: FSF 7,25 mió kr, TK 6,0 mió kr.
2020: TK rindar FSF 6,5 mió kr.
2021: TK rindar FSF 6,5 mió kr.
2022: TK rindar FSF 7,0 mió kr.
2023: TK rindar FSF 7,0 mió kr.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2016:** Ein meiriluti Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka undir við mentamálanevndini treytað av, at ognar- og ábyrgdarbýtið millum TK og FSF á vestursíðuni verður tikið upp til nærri støðutakan. Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, vísir til sína støðutakan í mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri, og tveimum ímóti at taka undir við tilmælilnum frá meirilutanum í fíggjarnevndini. Ein býráðslimur greiddi ikki atkvøðu.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Jógvan Arge greiddi ikki atkvøðu.

**Ískoyti**:
Ymsu byggistigini á Tórsvølli farnu 6-7 árini eru gjørd í samstarvi millum kommununa og Fótbóltssambandið. Í sambandi við undanfarnu byggingar hava umboð fyri býráðið verið tilnevnd í stýrisbólk, har eisini umboð fyri Fótbóltssambandið sita. Sambært avtaluni við Fótbóltssambandið um vestursíðuna er ætlanin, at byggingin verður skipað í partalagi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjóran mæla til at tilnevna tvey umboð fyri býráðið í stýrisbólkin fyri byggingina av Tórsvølli.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Annika Olsen, Bogi Andreasen og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Lisitatión uppá bygging av tribunum og bygnigni á vestursíðuni á Tórsvølli var 31. august 2017. J&K Petersen hevði lægsta boð kr. 88.499.385 handverkaraútreiðslur. Samráðst hevur síðani verið við arbeiðstakaran um tilboðið.

Harumframt er hetta tíðarskeiðið arbeitt nærri við konstrutkiónspartinum, har tað í mun til útbjóðingartilfarið er farið frá upprunaligu loysnini við betongveggi niður á hellu millum Tórsvøll og Niðara vøll til spunsvegg, sum mett verður er ein tryggari loysn. Gjørdar eru í hesum sambandi neyvari dýpdarkanningar. Har tað er djúpast eru 7,5 metrar. Spunsveggirnir verða slidnir niður eins og kent er frá havnagerð, og so verður stoypt í erva og harfrá bygt fast í sjálvt skýlið.

Staðfesta dýpdin niður á hellu og spunsveggirnir hava gjørt verkætlanina dýrari. Gjøgnumgongd hevur somuleiðis verið við ymisku fakini saman við høvuðsarbeiðstakara við tí endamáli at fáa prísin niður. Eftir hesar broytingar og samráðing eru handverkaraútreiðslurnar kr. 90.325.687.

Samlaður kostnaður íroknað byggiharraútreiðslur, ráðgeving, innbúgv, reinsiverk v.m. er kr. 118.569.663.

Við støði í hesum kostnaðinum er gjørt nýtt uppskot til samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya um bygging av vestursíðuni, har útreiðslukarmurin er kr. 118,5 mió, og har báðir partar rinda kr. hvør sín helming tó soleiðis, at parturin hjá Tórshavnar kommunu er í mesta lagi kr. 59,285 mió.

Áður eru játtaðar kr. 10 mió til verkætlanina árini 2016 og 2017. Fíggjartørvurin hjá kommununi er sostatt kr. 49,285 mió, sum sambært uppskotinum til samstarvsavtalu við Fótbóltssambandi Føroya verður at fíggja yvir íløguætlanina árini 2019-2025 soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| 2019 | kr. 6,000 | mió |
| 2020 | kr. 8,500 | mió |
| 2021 | kr. 8,500 | mió |
| 2022 | kr. 9,000 | mió |
| 2023 | kr. 7,500 | mió |
| 2024 | kr. 8,000 | mió |
| 2025 | kr. 1,785 | mió |
| | kr. 49,285 | mió |

Sambært tíðarætlanini verður byggingin liðug í oktober 2020. Byggingin verður eins og undanfarna byggistig skipað í partalagi. Umframt partalagssáttmála skal støða takast til høvuðsarbeiðstøkusáttmála við J&K Petersen, samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya og fígging.

Býráðið samtykti 16. juni 2016, at ognar- og ábyrgdarbýtið millum Tórshavnar kommunu og Fótbóltssamband Føroya verður tikið upp til nærri støðutakan. Upplýsast skal, at ítøkiligt uppskot er gjørt um slíkt býti, harundir uppskot um rakstrar- og samstarvsavtalu fyri Tórsvøll. Uppskotið verður lagt til politiska viðgerð í mentamálanevndini á fundinum í mars.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at:

- Góðkenna uppskotið til partalagssáttmála
- Góðkenna uppskotið til høvuðsarbeiðstakarasáttmála
- Góðkenna uppskotið til samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya
- At játta kr. 5 mió av tøkum løgukarmi 2017 konta 5775 Ítróttaranlegg L00001 til løgukontu 5775 L57026 Tórsvøllur vestursíðan
- At játta í alt kr. 49,285 mió á íløguætlanini fyri 2019-2025 samsvarandi samstarvsavtaluni við Fótbóltssamband Føroya,

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Komið er eftir, at upphæddin, ið kommunan skal rinda, í málslýsingin er uttan mvg. Við mvg er upphæddin kr. 62,990 mió, fíggjartørvurni tó 52,990. Býtið í yvir ár verður so hetta:

| | | |
|---|---|---|
| 2019 | kr. 6,000 | mió |
| 2020 | kr. 8,500 | mió |
| 2021 | kr. 8,500 | mió |

| | | |
|---|---|---|
| 2022 | kr. 9,000 | mió |
| 2023 | kr. 7,500 | mió |
| 2024 | kr. 8,000 | mió |
| 2025 | kr. 5,490 | mió |
| | kr. 52,990 | mió |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin vísir til tilmælið omanfyri við teirri broyting, at játtaðar verða í alt kr. 52,990 mió á íløguætlanini fyri 2019-2025.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundi 25. januar 2018 samtykti býráðið at góðkenna uppskot til partalagssáttmála, at góðkenna uppskot til høvuðsarbeiðstakarasáttmála, og at góðkenna uppskot til samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya, og í hesum sambandi at játta kr. 62,990 mió íroknað kommunalt mvg til byggingina av vestursíðuni á Tórsvølli.

Eftir hesa býráðssamtykt hevur FSF boðað kommununi frá samtykt í starvsnevnd FSF´s um, at FSF vil broyta byggiverkætlanina soleiðis, at verandi FSF-hús á vestursíðuni ikki verður út- og umbygt sum ætlað, men ístaðin verður tikið niður og at nýtt hús verður bygt uppaftur á staðnum.

Endamálið við hesi broyting er at fáa eina betri bygging bæði viðvíkjandi innrætting og funktiónum. Fyrimunur er eisini, at hæddirnar á vestursíðuni verða bundnar saman við suðurendan í somu linju, tí meðan verandi bygningur hevur fýra hæddir, verður tann nýggi at hava tríggjar hæddir eins og suðurendin.

Harumframt minkar broytta ætlanin munandi um váðan í byggingini serliga við atliti at avbjóðandi lendinum.

Fótbóltssambandið hevur í hesum sambandi boðað kommununi frá, at mettur meirkostnaður fyri hesa ætlan er kr. 25,0 mió, og at Fótbóltssambandið sjálvt vil fíggja henda meirkostnað. Fíggjarligi parturin hjá Fótbóltssambandinum av samlaðu byggingini á vestursíðuni verður eftir hesum uml. kr. 84,3 mió.

Hetta merkir tó, at verkætlanin er ikki heilt tann sama, sum býráðið samtykti á síðsta fundi út frá fyriliggjandi skjølum.

Í sambandi við fyrireikingarnar at prosjektera vestursíðuna varð henda ætlan at byggja nýtt hús heldur enn at út- og umbyggja verandi hús viðgjørd. Semja var um, at hetta er ein uppá allar mátar betri loysn, men  hon kundi ikki fremjast innanfyri tann fíggjarkarm, ið verkætlanin tá hevði.

Nú Fótbóltssambandið hevur samtykt at fíggja hesa broyting, verður mælt býráðnum til at broyta verkætlanina soleiðis sum lýst omanfyri, harundir at broyta tilhoyrandi

partalagssáttmálan, høvuðsarbeiðstakarasáttmálan og samstarvsavtaluna við Fótbóltssambandið, men har játtanin hjá kommununi framhaldandi verður ikki hægri enn tær kr. 62,990 mió íroknað mvg, sum longu eru játtaðar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at samtykkja verkætlanina soleiðis broytt og at tilhoyrandi skjøl – partalagssáttmáli, høvuðsarbeiðstakarasáttmáli og samstarvsavtala við Fótbóltssambandið verða broytt samsvarandi. Harumframt verður mælt til at staðfesta, at játtanin hjá kommununi til byggiverkætlanina á vestursíðuni á Tórsvølli framhaldandi verður ikki hægri enn tær kr. 62,990 mió íroknað mvg, sum longu eru játtaðar.

**Mentamálanevndin 28. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Víst verður til samstarvsavtaluna millum Fótbóltssamband Føroya og Tórshavnar kommunu grein 5 um fíggjarligu viðurskiftini. Sambært hesum rindar kommunan sín part av íløgukostnaðinum í pørtum soleiðis, at í 2025 er alt goldið. Byggingin er ætlað at verða liðug í 2020/21.
Fótbóltssambandið hevur sent fyrispurning til kommununa, um til ber at gjalda kommunala partin skjótari. Fótbóltssambandið greiðir frá, at til tess at fíggja byggingina, bæði meðan bygt verður og árini fram til 2025, noyðist Fótbóltssambandið at taka upp lán fyri partin hjá kommununi, ið ikki er goldin.
Í hesum sambandi er Fótbóltssambandið í gongd við at kanna tilboð frá fíggjarstovnum. Greitt er, at Fótbóltssambandið skal bera týðandi fíggjarkostnaðir av hesum. Lagt verður aftrat, at Fótbóltssambandið virðir avtaluna og góða samstarvið við kommununa um Tórsvøll, men loyvir sær at spyrja kommununa, um til ber at gjalda kommunala partin skjótari.
Sbrt. grein 5 í avtaluni, so kann kommunan gjalda gjøldini skjótari. Higartil hevur kommunan veitt 10 mkr. í fígging av 62,990 mkr. Uppskot hjá Fótbóltssambandinum er, at kommunan t.d. rindar 33 mkr. nú ella næsta ár, og restina 19,990 mkr. árini 2020-21, so at byggingin verður ikki verður óneyðuga dýrkað av fíggjarkostnaðum.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla til at broyta gjøldini soleiðis, at 33 mkr. verða játtaðar í 2018 av tøkum peningi. Harumframt verður mælt til at játta 10 mkr. av íløgujáttanini fyri 2020 og 9,990 mkr. í íløgujáttanini fyri 2021.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Sjúrður Olsen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus |
| Gunvør Balle | Turið Horn | Bergun Kass |
| | Heðin Mortensen | |